# FFblaðið

BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 336 Hósdagur 17. februar 2005 12,-




Baksíðan

## Ársins fyrsta-hjálpari 2004

Reyði Krossur hevur fyri fjórðu ferð kosið ársins fyrstahjálpara.





P/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8
Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 311909 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo




Er tó ársungi í mun til mammuna, sum gjørdist 105 ár!

Síða 20

# Karl Jákup Sigvardsen 100 ár


Vit selja DAEWOO bátamotorar

frá 70 hk til 1.000 hk




Umboð: Thorleif Samuelsen
Undir Gráasteini 68 · Tórshavn
Tlf: 31 77 13 · Fartlf: 28 31 38
E-mail: thorsam@post.olivant.fo


## Kollvelting í Reiðara-felagnum

Síða 5

## ALS-formaður blokeraði fiskimannauppskot sum vinnumeiriluti var fyri

Unti ikki fiskimonnum sømdir fyri eitt 5 oyra. Men at stuðla hægstløntum var eingin trupulleiki!

Síða 19


KÄRCHER

Vit eru einaumboð fyri KÄRCHER trýstspularum til ídnað.



Vit umvæla eisini

TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagøta 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42



Køliskipanir til skip, ídnað & handlar
Hitapumpur · Prosjektering · Montering




LM ELECTRIC
Hoyviksvegur 53 · tel 35 12 20 · www.lm.fo


## Fiskamarknaðurin í Bretlandi

Hvat kann gerast?

Síða 3

## Kunningarfundur hjá Fiskamarknaðinum

Fitt av fólki á fyrsta fundi hjá nýggja fiskamarknaðinum.

Síða 17

# FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

**FF-blaðið:** Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
**Útgevari:** Føroya Fiskimannafelag

**Blaðstjóri:** Óli Jacobsen
**Layout:** Føroya Fiskimannafelag
**Prenttilgerð:** Føroya Fiskimannafelag
**Prent:** Prentmiðstøðin



**Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin**



**- kemur út annan-hvønn hósdag**



mammu'sa

J. Paturssonar gøta 18 | FO-100 Tórshavn | Tlf 31 68 08 | Fartlf 22 12 40

## SKIPSTIMBUR & APTERING



Vit átaka okkum alt arbeiði innan skipstimbur og aptering, so sum nýggja messu, brúgv ella lugar.

**Sp/f Skipstimbur og aptering**

v/Jón Jacobsen · FO-470 Eiði · Tlf: 22 23 86

## AGN



sild / kúfiskur
makrelur
høgguslokkur
einkultfryst gágga

hava dagligt samband um alt landið

**P/F KAMBUR**

STRENDUR · telefon: 447720
ella 448095 · fax: 448744

SENT VERÐUR VIÐ STRANDFERÐSLUNI

## Umvælingar av bátum



Einasta góðkenda glasfiburbátasmiðjan í Føroyum.

Alt glasfiburarbeiði verður gjørt í góðkendum verkstaði.

Alt umvælingararbeiði á einum staði: leingjan av bátum, søla og íseting av motorum, - og so hava vit teir sera væl umtóktu slengrikjølarnar.

*Ring ella kom inn á gólvið.*

*Ein góð tænasta!*

**AWI BOATS SERVICE SP/F**

Rókahavnin 10 · FO-620 Runavík
Tel 448585 · Fartel 218585 · Fax 448785
awi@post.olivant.fo · awi.fo

## 100% tryggleika?





**Tí velja fleiri og fleiri maskinmeistarar Mobil smyrjiolju!**

petur & petur · 320870

**Mobil Oil Føroyar**

Mobil Oil Føroyar
Mykinesgøta 8, Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 319354 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

WWW.SMYRIL-LINE.COM

## PÁSKATILBOÐ

UPPLIVINGAR · STUTTLEIKI · MØGULEIKAR · HUGNI · FAMILJUSAMVERA



Tilboðini eru galdandi í tíðarskeiðnum 17. mars – 19. mai 2005

Danland hevur alt sum krevst til at tit og børnini fáa eina ógloymandi viku saman. Pakkið alt viðførið í bilin heimanifrá, koyrið umborð og hugnið tykkum á ferðini. Soleiðis kunnu tit koma frísk og vælúthvíld til dyrnar á tykkara Danland frítíðardepli.

**Alt so sera lætt, ja, næstan ov gott til at vera satt!**

**Danland**

**1 VIKA Í DANLAND-ÍBÚÐ**
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL

**úr 7.395,-**

**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland íbúð í 1 viku í Hirtshals, Ebeltoft, Blokhus ella Skagen Strand.

*Av øðrum góðum tilboðum kunnu nevnast:*

**SKALLERUP KLIT**
**1 VIKA Í SUMMARHÚSI**
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
**Prísir úr 7.995,-**

**SUMMARHÚSFERÐ**
**1 VIKA Í SUMMARHÚSI**
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
**Prísir úr 6.590,-**

**RØNBJERG FERIEC.**
**1 VIKA Í SUMMARHÚSI**
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
**Prísir úr 10.160,-**

**VIGSØ FERIECENTER**
**1 VIKA Í SUMMARHÚSI**
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
**Prísir úr 8.995,-**

**Íroknað omanfyri nevndu tilboðum er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari við wc/bað, innan. Uppihald í 1 viku á nevndu gistingarstøðum. Við í prísinum er eisini reingerð við fráferð.

**Fjølbroytt undirhald verður á páskatúrunum 17/3 og 24/3** við millum øðrum Hannibal og ..., ja, gita hvørjum.

SMYRIL LINE

**Droym tað ikki – royn tað!**

# Toska og hýsumarknaðurin í Bretlandi

**Hósdagin í seinastu viku løgdu John Rajani og Dann Jacobsen frá Sendistovu Føroya í Bretlandi eina frágreiðing um okkara útflutningi av fiski til Bretlands við serligum atliti til útflutningin av óvirkaðum fiski.**
**Henda frágreiðingin er drúgv, nærum 60 síður, og er eisini ein breið lýsing av bretska fiskamarknaðinum. Vit taka tí bert og niðurstøður úr frágreiðingini við serligum denti á viðurskifti, sum viðkoma okkum.**

Higartil hava vit kunna staðfest, at alheimsnýtslan av sjóføðslu er í eini støðugari menning. Tó er sannlíkt við verandi gongd, at framtíðar útboðið av sjóføðslu fer at vaksa lutfalsliga meiri enn eftirspurningurin. Størsti vøksturin av sjóføðslu fer at verða í framleiðsluni av alifiski, ið fer at vaksa munandi meira enn framleiðslan av veiddum fiski.

Rákið í nýtsluhættunum hjá brúkarunum boðar frá, at brúkarar í størri mun fara at leggja seg eftir feskum køldum vørum. Orsakirnar til hesa gongd eru m.a., at endaligi brúkarin gerst alsamt meiri varðugur um egna heilsustøðu, har góðska og føðslutrygd er í hásæti. Umframt er gongdin tann, at tað skal gerast lættari og høgligari hjá brúkaranum at fáast við tilgerðing av sjómati.

Á hvítfiskamarknaðinum verður væntandi ein minking í útboðnum av síðvandu hvítfiskasløgunum toskur og hýsa. Hóast hesa afturgongd í útboðnum, tykist onki grundarlag vera fyri príshækkingum fyri hesi bæði hvítfiskasløgini. Orsøkin til hesa støðu, er hópframleiðslan av hvítfiski í londum, sum t.d. Kina, ið forðar fyri einari avmarking í útboðnum av hvítfiski. Eisini er kappingin frá øðrum proteinkeldum, sum t.d. høsnarungum, við at ávirka prísin á hvítfiski.

Tá talan er um Stórabretland, hava vit staðfest, at seinastu árini eru landingarnar hjá bretsku fiskiførunum minkaðar alsamt. Samstundis er eftirspurningurin frá brúkarunum eftir sjóføðslu í støðugum vøkstri. Hetta merkir, at Stórabretland er vorðið sera bundið at innfluttari rávøru. Tó hevur hesin vaksandi eftirspurningurin ikki elvt til munandi príshækkingar, tí ein stórur partur av innflutninginum kemur úr láglønarsamfeløgum.

Rákið í bretsku nýtsluhættunum, er fyri ein stóran part tað sama, sum á heimsmarknaðinum. Størri vøkstur er í nýtsluni av feskum køldum fiskavørum. Samstundis fáa stóru handilsketurnar ein alsamt størri part av søluni, og harvið eina tryggari og valdsmiklari støðu á bretska marknaðinum.


*John Rajani hevur framløgu.*


*Dann Jacobsen hevur verið við til at gera kanningina.*


*Johanna á Bergi hevði orðið. Hon selur fisk fyri Kósina.*

### Støðan hjá føroyskum fiski í Bretlandi

Tá talan er um bretska marknaðin fyri føroyskan tosk og hýsu, so hevur hesin søguliga verið týdningarmikil fyri føroysku fiskivinnuna og føroyska samfelagið. Sum veitaraland av toski og hýsu hava Føroyar verið, og eru av stórum týdningi fyri Stóra Bretland.

Gongdin seinastu tíggju árini hevur tó havt við sær stórar broytingar í útflutningsmynstrinum av toski og hýsu til Stórabretlands. Útflutningurin av landfrystum toski er nærum horvin, samstundis er sum útflutningurin av óvirkaðum køldum toski er vaksin sera nógv. Tilsvarandi er lutfalsliga virði á hesum útflutningi minka seinastu árini. Sama mynstur er eisini galdandi fyri kølda óvirkaða hýsu, meðan sølan av landfrystari hýsu tykist verða meiri støðug. Sølan av sjófrystu vørunum seinastu árini hevur verið støðug bæði fyri tosk og hýsu.

Fleiri viðurskifti hava viðvirka til broytingina í útflutningsmynstrinum. Serliga er kappingarføri hjá føroysku framleiðsluvirkjunum versnað munandi seinastu tíggju árini, serliga sum ein avleiðing av nýggju kappingarneytunum úr Ruslandi og Kina. Eisini má ásannast, at marknaðarsamskipanin hjá føroysku framleiðsluvirkjunum í Stórabretlandi er vánalig, samanborin serliga við bretsku kappingarneytarnar. Hetta sæst eisini aftur í sølumynstrinum av føroyskum toski og hýsu, har meginparturin av fiskinum verður seldur ígjøgnum fyrstu liðunum á bretska marknaðinum.

Samanumtikið kann sigast, at føroyska framleiðsluvinnan hevur ikki megnað at finna lønandi framleiðslur úr toski og hýsu til bretska marknaðin, hóast rávørutilgongdin hevur verið góð.

### Hvat er til ráða at taka?

Spurningurin, vit eiga at seta okkum, er tí: Hvussu møta vit á bestan hátt hesari avbjóðing, og hvussu tryggja vit at okkara samfelag ikki bert verður ein útflytari av rávøru, men heldur kann mennast til eitt framkomið fiskivinnusamfelag?

Vanliga tá tosað verður um alheimsgerðina og ta hóttan, hon er fyri vinnulívið í vesturheiminum, verður sagt, at talan er ikki um eina hóttan, um bert vinnulívið í vesturheiminum klárar at flyta seg fram í virðisketuni, hetta frá sonevndari frumframleiðslu til eina meiri vitanartunga framleiðslu. Alheimsgerðin skal vendast frá at vera ein hóttan til ein møguleika.

Tó er tað at flyta eina vinnu fram í virðisketuni ikki nakað, ein kann gera frá degi til dags. Og møguliga ber hetta ikki til yvirhøvur. Møguliga eru forðingarnar ov stórar, og møguliga hava vit ikki neyðuga kunnleikan og vitanarstøðið, sum er neyðugt.

Hyggja vit nærri eftir møguleikanum at menna landframleiðsluna soleiðis, at hon kann flyta seg fram í virðisketuni, so eigur framleiðsluvinnan at fara undir øðrvísi framleiðslu av toski og hýsu. Nýggjar vørur mugu framleiðast og til nýggjar marknaðir. Uttan at fara í smálutir tykist greitt, at framleiðsla av virðisøktum vørum, sum t.d. feskum køldum vørum, innballaðum vørum (coated), royktum vørum og lidnum verum, eru hóskandi møguleikar.

Vit hava t.d. sæð, at okkara kappingarneytar úr Íslandi fyri fleiri árum síðani eru byrjaðir at menna aðrar marknaðir í Stórabretlandi, har kappingin er meiri til teirra fyrimun. Seinastu árini er útflutningurin av køldum toska- og hýsufløkum, sum loftvegis verða flutt til Stóra- Bretlands, vaksin munandi.

Um miðjan 90-ini lá útflutningurin um 500 t. Nú er hann 10 ferðir so stórur. Tó eru bert um 20% hýsa, og tað er serliga føroyska hýsan sum verður útflutt óvirkað.

Íslendska vinnan hevur í ávísan mun megnað at flutt sína framleiðslu frá einum marknað, har kappingin er herd, til ein marknað har íslendska vinnan hevur nakrar kappingarfyrimunir.

Eisini hava vit sæð, at størru íslendsku framleiðsluvirkini hava styrkt sína støðu á marknaðinum fyri virðisøktum vørur. Hetta er tó ikki gjørt við at menna framleiðslu í Íslandi, men heldur at menna egna framleiðslu í Stórabretlandi við at keypa framleiðsluvirkir í Stórabretlandi, sum hava sáttmálar við stóru handilsketurnar.

Í Norra hevur sama gongdin eyðmerkt útflutningin av hvítfiskasløgum. Skifti frá frystum til fesk køld fløk er í støðugari menning. Feskastu tølini vísa, at norski útflutningurin av feskum toska flaki í 2003-2004 vaks í virði, við 86 prosentum. Útflutningurin av feskum hýsu og upsa fløkum vaks í virði við ávíkavist 124 og 51 prosentum í sama tíðarskeiði. Um somu tíð hevur ein afturgongd verið í útflutninginum av øllum frystum blokkvørum og flak-vørum av toski, upsa og hýsu.

### Er tað møguligt hjá føroysku framleiðsluvinnuni at flyta seg fram í virðisketuni?

Til tess at svara hesum spurningi, fara vit niðanfyri at hyggja eftir nøkrum av teimum viðurskiftum, sum eru týdningarmiklir, um eitt tílíkt skifti skal lata seg gera. Mong viðurskifti kundu verið áhugaverd, men vit hava valt at hyggja serliga eftir:

- Góðsku- og góðskustýringsskipanum
- Sporføri
- Kostnaðarstøði
- Fiskiveiðiumsiting
- Flutningi
- Grindadrápi
- Strategic Partnership
- Vøru- og marknaðarmenning

Týðandi viðurskifti - skulu vit flyta okkum nærri marknaðinum

### Góðska og góðskustýringsskipanir

Góðskan á føroyskum toski og hýsu fær bestu skoðsmál frá bretskum framleiðarum og umboðum fyri uppboðssølumarknaðir. Hinvegin er góðskan á føroysku hýsuni versnað nakað seinastu árini, serliga tí hon hevur verið smáfallandi. Men yvirhøvur er góðskan á einum høgum støði, eisini tá samanborið verður við Ísland og Norra. Bretskir framleiðarir siga, at í dag er eitt høgt góðskustøði ikki bert ein treyt, men ein fyritreyt fyri at kappast á bretska marknaðinum. Um góðskan ikki er í lagi, so kunnu rávøruveitarar, sum t.d. Føroyar, gloyma alt um at gera seg galdandi á bretska marknaðinum.

Krøvini frá retail kundunum eru ógvuliga strong til tess at tryggja, at endaligi nýtarin av vøruni fær røttu góðskuna.

Góðska og góðskustýringsskipanir kunnu ikki sigast at vera ein forðing fyri føroyskari fiskavøruframleiðslu og útflutningi á bretska marknaðin. Góðskustýringsskipanir eru og hava verið partur av føroyskari framleiðslu í longri tíð. Hinvegin kann hugsast, at vit í Føroyum fara at hyggja eftir heildarloysnum, ið liggja tættari at framtíðar ynskjum og krøvum hjá sølufyritøkum, ið selja til endaliga brúkaran. Ein møgulig heildarloysn kundi verið ein samantvinnan av góðskustýring við einari sporførisskipan.

### Sporføri

Seinastu tíðina hevur verið nógv tosað um sporføri í matvøruframleiðslu, eisini í fiskavøruframleiðslu. Fyribrigdið hevur stungið seg upp, mest orsakað av altjóðageringini, men eisini orsakað av einari styrktari brúkararørslu. Altjóðagerðingin hevur m.a. havt við sær, at ymiskt tilfar í matvøruframleiðslu kann hava sín uppruna úr øllum heimsins londum. Í hesum sambandi er neyðugt við skipanum, sum kunnu spora hetta tilfar/vøru til upprunakelduna, um nú eitthvørt eiturevni ella líknandi skuldi verið í tilfarinum, til tess at tryggja og verja brúkaran.

Fyri ikki at gerast ein eftirbátur, er tað greitt, at føroyingar mugu finna útav, hvussu vit skilabest seta í gongd eina skipan, ið tryggjar fult sporføri í

| Viðurskifti | Forðing/ikki forðing |
|---|---|
| Góðsku- og góðskustýringsskipanir | Ikki ein stór forðing |
| Sporføri | Ikki ein stór forðing |
| Føroyska kostnaðarstøðið | Stór forðing |
| Flutningsmøguleikarnir | Stór forðing |
| Føroyski hugsunarhátturin og áskoðan á vinnuvirksemi | Sera stór forðing – neyðugt við nýhugsan |
| Marknaðarvitan | Sera stór forðing |
| Burðardygg fiskiveiðiumsiting | Ivasamt, kann gerast ein stór forðing |
| Grindadráp | Er/kann gerast ein stór forðing |

*Niðurstøðan kann lýsast við þesi talvu.*

føroyskari fiskiveiðu og framleiðslu.

Ein møgulig føroysk loysn kann vera ávegis, tí í verandi løtu ger føroyska smápartafelagið Bitland, eitt samtak av 12 føroyskum fyritøkum, eina verkætlan, ið hevur til endamáls, at øll sporførisdata í føroysku fiskivinnuni verða flutt digitalt millum liðini í virðisketuni.

### Kostnaður og prísur

Sum við allari framleiðslu, er kostnaður sjálvsagt sera týdningarmikil. Kanska serliga er kostnaðarstýringin umráðandi í framleiðsluni av matvørum, sum t.d. fiskavørum. Á sama hátt sum við góðskuni á fiskinum, er tað ein fyritreyt, at kostnaðurin á fiskinum ella prísurin á rávøruni er kappingarførur. Hinvegin eru bretskir fiskaframleiðarar samdir um, at teir ikki bert kunnu hyggja eftir prísinum, men at tað er heildin sum er umráðandi, t.v.s. at góðska, prísur, nøgd og veitingartrygd o.s.fr. Tó er torført at taka dámillum, hvørji av hesum viðurskiftum er mest umráðandi.

Samstundis sum ketuhandlarnir hava fingið alsamt meiri at siga á marknaðinum, er høvuðsdenturin broyttur frá at verða lagdur bert á prísin, til at fevna meiri sum eina heild av ymiskum viðurskiftum. Tó er hetta ikki galdandi fyri allar vørur, men kanska serstakliga fyri vørur, sum t.d. fesk fløk til ketuhandlar. Í hesum førum arbeiða veitarar til ketuhandlar ofta við fleksiblum prísáttmálum, har veitarin afturfyri lýkur ávísar treytir, sum t.d. eitt ávíst nøgdar- og góðskustøði, veitingartrygd og reglusemi.

Sum longu staðfest, eru føroyingar ikki kappingarførir í prísi, tá ið talan er um siðvandar frystar vørur, sum eru í beinleiðis kapping við láglønarsamfeløg. Hinvegin er ivasamt, um føroyingar eru kappingarførir í øðrum vørubólkum, t.d. fesk fløk ella í value-added vørum. Hetta má síggjast við atliti at fleiri ymiskum viðurskiftum.

Uttan mun til føroyska kostnaðarstøðið, serliga lønarkostnaðin, so eru møguleikarnir fyri at kappast á javnum støði við vørum, ið liggja longri "frammi" í virðisketuni, munandi betri, við t.d. íslendskar og norskar vørur.

### Burðardygg fiskiveiðiumsiting

Tá ið bretskir framleiðarar skulu velja rávøruveitarar, verður sera stórur dentur lagdur á, at rávøran hevur sín uppruna úr einum landi, har fiskivinnan verður umsitin á ein burðardyggan hátt. T.d. vilja fleiri bretskir framleiðarir ikki keypa fisk, ið er veiddur á bretskum øki, tí serliga toskastovnarnir í hesum økjum sigast at vera sera illa fyri. Enn einaferð eru tað krøvini frá stóru handilsketunum á smásøluøkinum og sterka brúkararørslan, ið leggja eitt stórt trýst á allar partar og øll lið í virðisketuni.

Føroyar og føroyska fiskivinnan kann møguliga gera sær dælt av hesari støðu. Serliga tá ið hugsað verður um bretska áhugan fyri føroyskari fiskiveiðiumsiting, har Føroyar ofta verða nýttar sum ein fyrimynd fyri burðardyggari umsiting.

Yvirhøvur er hugburðurin hjá bretsku framleiðarunum, at fiskiveiðan í londum sum Føroyum, Íslandi og Norra verður umsitin á ein burðardyggan hátt. Tí gera bretskir framleiðarar, ið keypa rávøruna úr áðurnevndu londum, nógv burturúr, til tess at siga sínum kundum frá hvaðani rávøran hevur sín uppruna.

Hartil samstarvar ein stórur partur av fiskaframleiðsluvinnuni í Stórabretlandi saman við ymiskum náttúruverndarstovnum og sølufyritøkum, til tess at flokka og seta mát fyri burðadyggari framleiðslu fyri sjóføðslu. Eitt av hesum samtøkunum er Marine Stewardship Council (MSC), ið kann samanberast við vælkenda "svanamerkið". Fleiri av teimum spurdu fiskaframleiðarunum søgdu seg antin hava fingið MSC viðurkenning, ella so fóru teir at fáa hesa viðurkenning í næstum.

### Grindadráp

Nakað sum kann gerast ein marknaðarforðing fyri føroyskan tosk og hýsu í Stórabretlandi er føroyska grindadrápið. Í øllum førum siga stóru bretsku aðruhonds framleiðararnir, at føroyska grindadrápið er ein stórur meinbogi, um teir skulu keypa føroyskan fisk og framleiða hendan til stóru bretsku handilsketurnar.

Hinvegin søgdu somu framleiðarar, at um føroyski fiskurin var kappingarførur mótvegis íslendskum ella norskum fiski, so kundi tað væl hugsast, at føroyska vøran varð tikin fram um aðrar vørur, hóast føroyskt grindadráp.

### Samskipan av flutningi

Bretskir keyparar og framleiðarar av fiskavørum leggja sera stóran dent á, at teirra rávøra kemur til røttu tíðina og á ein hátt, ið tryggjar bestu góðskuna. Flutningssambandið millum rávøruveitara og framleiða var ein av høvuðsorsøkunum til, at framleiðararnir høvdu valt verandi rávøruveitara av feskum fløkum.

Í hesum sambandi var loftvegis flutningurin úr Íslandi av feskum fløkum ofta nevndur. Vøran, ið teir selja til ketuhandlarnar, er ikki meira enn 24 tímar gomul, tá ið hon fer inn á hyllurnar í sølubúðunum. Í verandi løtu er talan næstan bert um fesk fløk úr Íslandi, ið verða flogin til Humberside flogvøllin, beint uttanfyri Grimsby og Hull. Afturat hesum er, at tað er møguligt hjá einum bretskum framleiðara at bíleggja bæði størri og smærri nøgdir av feskum fløkum úr Íslandi, alt eftir hvat teirra kundar vilja hava.

Ynskini hjá stóru framleiðarunum sýnast at vera at menna fleiri loftvegis flutningsambond til veitarar úr øðrum londum, til tess at spjaða teirra rávørugrundarlag. Hetta kann verða ein møguleiki, ið føroyingar kunnu gera sær dælt av.

Eitt er vist, at uttan loftvegis flutningssamband millum Bretland og Føroyar, verður tað sera trupult at kappast á javnum føti, við t.d. Ísland, á marknaðinum fyri feskar køldar vørur.

Í hesum sambandi gerst tað ógvuliga týdningarmikið, at hugt verður eftir fleiri møguligum loysnum á einari flutningssamskipan millum Føroyar og Stórabretland. Hetta er neyðugt bæði til tess at veita tað neyðugu veitingartrygdina og reglusemi til marknaðin, og røkka bretska marknaðin við vørum, sum eru kappingarførar.

### Strategic Partnership

Á einum framkomnum føðsluvørumarknaði sum tí bretska, er hugtakið "strategic partnership" vorðið ein partur av dagliga virkseminum millum allar partar í virðisketuni. Tískil er umráðandi, at vit eisini frá føroyskari síðu seta okkum inn í hetta tankamynstur.

Í hugtakinum liggur m.a., at partar í einari virðirsketu, í ein ávísan mun, sameina virksemi sítt til tess at økja um produktivitetin og skapa enn skjótari loysnir fyri kundan. T.d. kann ein seljari og keypari gera sær dælt av sínámillum ágóðum við at skilja tvørleikarnar og deila vitanina hjá hvørjum øðrum. Hetta letur eisini upp fyri møguligum peningaligum íløgum millum partarnar, soleiðis at partarnir í virðisketuni verða drignir nærri at hvørjum øðrum, bæði á einum vitanar og ognaarrættarligum støðið.

### Vøru- og marknaðarmenning

Greitt er, at føroyskur útflutningur til Stórabretlands rakar fyrstu liðini í bretsku virðisketuni. Um føroyskar útflutningsvørur skulu koma longri inn í bretsku virðisketuna, er neyðugt við serligari vitan og kunnleika, til tess at menna verandi vørur og marknaðir, og eisini vitan til at menna nýggjar vørur og marknaðir.

Um ein skal verða kappingarførur á einum framkomnum marknaði, ið er rikin av brúkarunum saman við nøkrum fáum handilsketum, er neyðugt við einum stórum atliti at marknaðarbroytingum. Her er ikki bert talan um broytingar á prísstøðinum, men kanska serliga broytingar í brúkaramynstrinum, vanum o.s.fr.

Sostatt er neyðugt hjá føroysku vinnuni at vinna sær tað neyðugu vitanina og kunnleikan, ið kann føra føroyska framleiðslu longri fram í bretsku virðisketuni. Tað sama gerst neyðugt hjá føroyskum fyritøkum, um hesar skulu uppfatast sum ein egnaður og veruligur partur av áðurnevndu strategisku partnerships.

Hinvegin er atgongdin til ta neyðugu vitanina munandi nervað av tí veruleika, at føroyska vinnan ikki er til staðar á marknaðinum við egnum fyritøkum sum vit fyrr høvdu við Chaldur.

Tó er tað framvegis soleiðis, at tann núverandi føroyska vitanin um bretska marknaðin ella marknaðaratlit, antin ikki til staðar, ella verður hendan ikki fult roynd. Í øllum førum eru nógvar ábendingar, at føroyska vinnan hevur havt trupult at tillaga seg broyttu marknaðarviðurskiftini.

### Hugburðurin hjá bretum mótvegis føroyskari fiskivinnu

Tá ið bretski framleiðarin skal velja ein rávøruveitara, verður stórur dentur lagdur á tey søguligi sambondini og tær samstarvsroyndir, ið ein hevur havt við veitarar gjøgnum tíðirnar. Smb. fleiri bretskum framleiðarum, eru tað ofta royndirnar og søguliga sambandið millum seljara og keypara, ið fær avgerandi týdning í valinum av rávøruveitara. Í hesum sambandi fáa føroyingar bestu skoðsmál, og verða mettir sum álítandi og eitt fólkaslag, ið dugir at halda orð.

Hinvegin er hugburðurin hjá flestu bretsku framleiðarum tann, at føroyingar altíð hava verið eitt stig aftanfyri, tá um vørumenning og marknaðaratlit ræður. Hesin hugburður kann forða fyri at føroysk framleiðsla og framkomin rávøra sleppur inn um gáttina hjá stóru bretsku framleiðarunum. Framleiðararnir siga m.a., at Føroyar aldrin hava gingið á odda í primér fiskavøruframleiðslu, og at føroyingum vantar eitt størri atlit at endaliga brúkaranum og marknaðinum.

Haraftrat verður Ísland ofta nevnt sum dømi um, hvussu føroyingar skuldu havt gjørt og borið seg at í mun til marknaðarmenningina. Sambært einum bretskum framleiðara hugdi íslendska vinnan frameftir í virðisketuni og spurdi hvørja vøru, marknaðurin spurdi eftir og hvørja vøru, teir megnaðu at framleiða í kapping við aðrar. Síðani fóru íslendsku framleiðararnir undir at útbyggja og menna flutningssambandið til marknaðin.

Sjálvandi skulu hesar útsagnir takast við fyrivarni, serliga tí talan er um ávísar vørubólkar. T.d. eru frystu fløkini, ið verða framleidd umborð á føroysku verksmiðjutrolarunum væl umtókt av bretsku keyparunum. Harumframt eru tað fleiri smærri bretskir keyparar, ið gleðast um fesku føroysku hýsuna, ið fæst til keyps á bretska marknaðinum. Tó skerst tað ikki burtur, at í hesum førinum er talan um óvirkaða vøru, har virðisøkingin verður framd og ágóðin av hesum virksemi liggur í Stórabretlandi.

### Onnur týdningamikil viðurskifti

Omanfyri hava vit tikið samanum ymisk viðurskifti, sum eru týdningarmikil, um føroyska framleiðsluvinnan skal kunna flyta seg longri fram í virðisketuni. Hesi viðurskifti eru sera týðandi og eru helst ein fyritreyt, um eitt tílíkt skifti skal lata seg gera. Tað eru tó eisini onnur viðurskifti, sum eru eins týdningamikil og sum hava eitt meiri bygnaðarligt eyðkenni.

ES lóggáva, serliga á handilsøkinum, fevnir eisini um Stórabretland og rakar sostatt eisini føroyskan útflutning, og virkar til tíðir sum ein forðing fyri menning av hesum útflutningsmarknaði. Hetta er serliga viðkomandi, tá ið talan er um, at Føroyar skulu fara undir at framleiða og útflyta fleiri value-added vørur. Til dømis kann nevnast, at Føroyar hava eina innflutningskvotu uppá 1200 tons, tá talan er um paneraðar fiskavørur til ES marknaðin, laksur undantikin. Eftir kvotuna uppá 1200 tons fellur ein tollur á vørurnar uppá 20 prosent.

### Til seinast

Samanumtikið kann sigast, at skal føroyska fiskivinnan megna at flyta seg longri fram í virðisketuni, skulu stór stig takast. Neyðugt er við eini hugburðsbroyting bæði í vinnuni og í politisku skipanini. Ein fyritreyt fyri at takast kunnu stór stig er, at vinna og politiskir myndugleikin arbeiða eftir sama leisti, har politisku karmarnir stuðla undir eina felags hugsjón um eitt framtíðar framkomið føroyskt fiskivinnusamfelag.

# Meira frá Menakhem

Menakhem Ben Yami gjørdist kendur í føroyskum fiskivinnuumhvørvi, tá hann sum gestur hjá FF seinasta summar luttók í Farec ráðstevnuni um fiskiveiðuskipanir. Hann sá umrøddu viðurskiftini út frá einum fiskimannasjónarmiði, og hetta eru vit ikki so von við á okkara leiðum.

Hansara framløga á ráðstevnuni varð prentað í FF-blaðnum og er eisini eitt av fylgiskjølunum til okkara seinastu ársfrágreiðing, sum er at finna á okkara heimasíðu.

Menakham er ein sera spennandi persónur, og sum fyrsta blað í vesturheiminum kundu vit bera hansara søgu sum pólskur jøði undir krígnum. Sum slíkur varð hann dømdur at verða fyribeindur, men á ein ótrúligan hátt slapp hann til rýmingar og kom heim til Ísrael, har hann var við til at stovnseta statin Ísrael. Her hitti hann Honnu, sum hann giftist við, og sum eisini slapp undan týningarlegu hjá nasistunum, tí hon var ov sjúk at verða fyribeind.



*Menakhem Ben Yami*

Nú heimurin hevur hátíðarhildið, at 60 ár eru liðin síðan týningarlegan Auschwitz var fríað, kann verða nevnt, at vermamma Menakhem endaði sínar dagar har.

Menakhem hevur skrivað ein hóp av bókum og ritgerðum um fiskivinnu og fiskiveiðu. Og undan jólum fingu vit bók, hann hevði skrivað saman við tveimum øðrum fiskiveiðufrøðingum. Bókin eitur "Out of Fishermen's Hands…"

Í eini frásøgn siga høvundarnir, at teir her hava roynt at skapa eina greiða frásøgn um ta skjótt økjandi oyðingina av tilfeinginum í havinum, sum er skapt av menniskjum. Teir hava eisini roynt at lýst, hvussu fiskimenn sum heild eru ørkymlaðir av, at teirra livumstøður verða fyribeindar av ráari imperialismu, soleiðis sum hon hevur verið sædd upp gjøgnum øldir á øðrum økjum.




Týðiliga er tað fyrst og fremst veiðan eftir fiski til fiskamjølsframleiðslu, sum teir ræðast. Síðan í 70-unum er veiðan til hetta endamál økt, so hon er umleið 30-40% av samlaðu veiðuni. Tað eru londini í Evropa sum mynda henda fiskiskapin, har Noreg á okkara leiðum er á odda.

Bókin er fyrst og fremst ein verja av tí "lítla" fiskimanninum. Hetta er útróðrarmaðurin við síni mentan, sum myndar nógv tann størsta partin av heimsins fiskimonnum. Hetta eru teir fiskimenn, sum ikki eru ein hóttan mótivegis fiskastovnum og sum liva í sátt við náttúruna, og sum fyrst og fremst ræður sær sjálvum, nær hann fer út og nær tað er meira hóskandi at vera heima.

Roknað verður við, at umleið 14 mio. av fiskimonnum eru í heiminum. Av hesum eru tær 13 mió. smábátafiskimenn, meðan restin eru við teimum størri skipunum. Ofta er talan um stórar verksmiðjutrolarar, sum eisini verða roknaðir sum ein hóttan móti teimum smáu fiskimonnunum. Í øðrum førum verða stórar nøgdir veiddar til mjølframleiðslu, og hetta verður eisini roknað sum ein hóttan móti teimum smáu. Heilt galið er, tá so kapitalisman kemur inn í myndina. Tá er vinnan rættiliga tikin úr "the hands of fishermen."

Tað verður ofta tosað um eina útróðrarmentan, sum fánar burtur, so hvørt bátarnir gerast størri. Og tað er hesa mentan, ríthøvundarnir gera seg til talsmann fyri.

Bókin er tilsamans 238 blaðsíður og hevur eina fjøld av upplýsingum um fiskiveiðu og fiskimenn sum heild. harafturat eru nógvar myndir í bókini. Tí er ein slík bók eisini áhugaverd hjá okkum her í Føroyum at lesa.

Bókin kann bíleggjast á hesi heimasíðuni: http://sharpgary.org

Hon kostar 15 US-dollarar + postgjald.

# Kollvelting í Reiðarafelagnum

Tað er ikki ofta, at kollveltandi tíðindi eru at frætta frá tí skjótt 100 ára gamla reiðarafelagnum. Men hetta hendi nú ein dagin.

Forsøgan er sáttmálatrætan millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Her hava júst verið drúgvar tingingar, sum fyrst endaðu við einum vrakaðum semingsuppskoti og síðan við einum nýggjum semingsuppskoti mánanáttina í seinastu viku.

Føroya Reiðarafelag bað um at fáa møguleikan at leggja hetta uppskot fyri ein limafund, og tí varð freistin at geva svar sett til seinnapartin hósdagin. Fyrrapartin sama dag hevði Føroya Reiðarafelag sín limafund, sum endaði við eini fráboðan um, at frá nú av skuldi tað ikki vera Føroya Reiðarafelag, sum skuldi tingast um ein samlaðan sáttmála, men framyvir skuldu serfeløgini hjá reiðarunum tingast hvør sær um sáttmála.

Vit gita, at orsøkin til hetta er, at samráðingar millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Skipara- og Navigatørfelag seinastu ferðirnar fyri ein stóran mun hava snúð seg um einstøk skip og einstakar bólkar, og at teir bólkar, sum ikki varða av hesum málum, ikki vilja koma sær í tann vanda, at skulu noyðast at vera lagdir í einum verkfalli vegna mál, sum eru teimum viðkomandi, soleiðis sum tað meira enn so er hent fyrr.

Hetta er ein rættilig kollvelting. Í allari sáttmálasøguni hjá Føroya Reiðarafelag hevur

verið tingast um sáttmálar við tey fýra manningarfeløgini í einum. Sáttmálin er fyri ein part felagsreglur fyri allar veiður, og dømi um hetta eru uppsagnarreglur, eftirløn, trivnaðarmál, frítíðarløn v.m. Síðan eru aðrir sáttmálar fyri teir ymisku veiðuhættirnar.

Hetta hevur í hvussu er ongantíð verið nakar serstakur trupulleiki í samráðingunum millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag. Fyrsti sáttmálin millum feløgini varð gjørdur í 1912. Síðan tá er eitt ótal av sáttmálum gjørdir, og tann seinasti varð undirskrivaður fyri júst einum mánaði síðan. Víst vóru partarnir ikki serliga nøgdir, men teir samdust at enda.

Eftir einum fyrraparti hevur Føroya Reiðarafelag nú broytt hesa longu praksis soleiðis, at nú skulu manningarfeløgini samráðast við hvønn undirbólk sær hjá Føroya Reiðarafelag. Hesir undirbólkar eru 8 í tali og umboða t.d. línuskip, ísfiskatrolarar, nótaskip, rækjutrolarar, verksmiðjuskip v.m.

Hetta merkir so aftur, at í staðin fyri at hava ein mótpart skulu tey fýra manningarfeløgin nú hava átta mótpartar. Vit duga illa at síggja, at hetta í heila tikið kann bera til. Ein sáttmáli er ein heild, hóast áhugamálini kunnu vera ymisk hjá teimum ymisku bólkunum. Og sum sagt eru nógv mál felags fyri allar bólkarnar. Í hesum samráðingum hevur soleiðis nógv tíð verið brúkt til at samráðast um uppsagnarreglur, ið mugu vera felags fyri allan flotan. Tað vil tí vera ørskapur at hava 8 mótpartar at tingast við um sama evni. Og tað fer at vera sera trupult at tingast við 8 mótpartar um spurningar viðvíkjandi teimum einstøku veiðuhættunum.

Nú verður hetta í fyrsta lagi aktuelt hjá Føroya Fiskimannafelag í desember 2006, tá sáttmálin aftur kann sigast upp. Men tað er ikki vist, at Føroya Fiskimannafelag fer at leypa á leistum fyri hesi nýggju tónunum hjá reiðarunum. Vit fara at viðgera hendan spurningin eins og vit fara at kanna, um eingin rættarsiðvenja er á hesum øki, og um ein sáttmálapartur uttan víðari kann blaka alt frá sær, sum tað sær út til, at ætlanin er her.

## Heimsmeistaraheitið í egning

20. august í ár, fer Norðlýsið, saman við øðrum at fyrireika fyrsta heimsmeistaraheitið í egning nakrantíð.

Tað hevur verið tosað nógv og leingið aftur og fram í Klaksvík um at skipa fyri einum heimsmeistaraheiti í egning. Nú hevur so Norðlýsið, saman við øðrum tikið stig til at skipa fyri eini slíkari kapping, og dagurin er setur at vera 20. august í ár.

Ætlanin er, at eitt stórt tiltak við fjølbroyttari skrá skal leggjast fyri leygardagin 20. august, har alskyns undirhald við tilknýtið til sjógv og fiskarí skal fyriskipast.

Enn er skráin fyri dagin ikki løgd, men arbeitt verður við hesum og um nakrar dagar verður ein skrá kunngjørd og eisini ein reglugerð fyri heimsmeistaraheitið í egning.

Norðlýsið
tlf 456285

SaxOføn
TLF. 31 68 08
J. Paturssonar gøta 18

# Umhvørvið kring Fabrikkina




*Hetta er Havnin í heilt gomlum døgum, áðrenn fabrikkin kom. Uttast t.h. er "gamla Hospital" og uttast t.h. er kirkjan hjá Bauer.*

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*




*Eina ferð vóru skip í Havn! Fabrikkin uttast t.h.*

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*




*Hvør kann trúgva, at hetta einaferð hevur verið Vágsbotnur.*

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

**Í seinasta blaði høvdu vit eina frásøgn um Fabrikkina og virksemið hjá Valdemar Lützen. Hesa ferð hava vit eisini eina frásøgn um grannalagið í Rættará, sum Andreas Lava Olsen hevur skrivað.**

Tað vóru fleiri gomul hús í grannalagnum kring fabrikkina - fyrst húsini hjá J.A.Arge, síðan koma vit til madam Andersens hús. Tey eru bygd í 1853, tí tey síggjast á gomlum myndum har Havnar Kirkja hevur gamla tornið. Tað nýggja tornið bleiv bygt í 1866.

Uttanfyri liggur ella stóð gamla hospitalið, ið nú er flutt niðanfrá sjónum. Byggiár 1828-1829 og bygt uppí í 1865. Var í brúki líka til 1925, tá flutt var út á Drotning Alexandrines hospital.

Fara vit so niðan um vegin, koma vit til húsini hjá Sørin Emil Müller og konuni Margrethe yviri í Trøð. Sørin bygdi á heimabeitinum hjá Bauer í Rættará og flutti hagar at búgva í 1867. Skrivstovuna og posthúsið hevði hann heima í Gongini til 1906, tá C. C. Danielsen tók við sum postavgreiðslumaður og flutti posthúsið út í Tinganes. Sørin Müller doyði í 1922 og sonurin Pól Müller festi garðin.

Úti í Rættará keypti H. C. Müller húsini frá katolikkunum, tá ið hesir fóru úr Føroyum í 1874. Hesi húsini hevði snikkarin Christen Holm, ið var sonur kvívíksprestin Niels Lassen Holm bygt og selt í 1859 til katolikkaprestin Bauer. Christen Holm kallaði húsini Christines Minde eftir konu síni. H. C. Müller keypti húsini fyri 7.200 krónur, og hann kundi nú sigast at kalla tey upp eftir konu síni. Húsini leigaði Müller út.

Her búði m.a. íslendski skiparin Mathias Thorsteinsson, ið førdi "Sprite" heim úr Íslandi í 1882, tí skiparin Niclas á Trappini var deyður har yviri. Thorsteinsson var nøkur ár í Føroyum. Um veturin lærdi hann fleiri føroyskar skiparar, sum vóru ólærdir í navigatión. Her búði eisini svenski ríkmaðurin Østrøm, sum bygdi fabrikkina, ið byrjaði framleiðslu sína í 1887, men skjótt steðgaði.

### Bauer kirkjan

Bauer hevði í 1863 fingið til keyps nakað av Álakershaga til heimabeiti. Her hevði hann tvær kýr . Bauer hevði stóran kál- og blómugarð, ið kom at liggja kring húsini og kirkjuna. Bauer bygdi húsini um innan og uppí syðra enda. Norðanfyri bygdi hann eina kirkju, ið rúma kundi 200 fólkum. Vindeyguni eystureftir og teir ovastu rútarnir vóru av litaðum reyðum og grønum glasi.

Eg kann skoyta uppí, at tá kirkjan var niðurtikin, blivu fleiri av hesum vindeygum sett í fleiri hús bæði í grannalagnum - hjá Liasi - í Oyspustovu - í Sloytstovuna, ið bleiv bygd norður úr kommunuskúlanum.

So vakur og sjáldsamur var blómugarðurin við vakstrarhúsi, at ikki bert havnarfólk, men eisini ólavsøkugestir høvdu til fastan skikk, at fara út í Rættará at skoða allan henda vakurleika. Blómurnar, sum prýddu Havnina og heiðursgrindina fyri Chr.IX á vitjan í Havn í 1874, vóru sjálvandi úr blómugarðinum hjá Bauer.

### Um H. C. Müller

H. C. Müller og Maren Christine áttu sjey børn. Fimm búsettur í útlondum. Eftir í Føroyum vóru, Sørin og Amalia. Amalia giftist við Johan Joensen í Havn, vanliga nevndur Grønlands-Johan, tí hann í nøkur ár var kolonistjóri í Grønlandi. Hon fekk Christines Minde, og búði har til hon doyði. Amalia helt skúla her í mong ár.

### Elias í Rættará

Nú koma vit til húsini hjá Elias Johansen í Rættará, hann var borin í heim 1871 norðuri í Hvalvík; foreldur hansara vóru Johan Olsen og Johanna Elisabeth ættað av Eiði. Tá Elias var 15 ár, kom hann til Havnar og settist í skósmiðjulæru. Um 20 ára aldur giftist hann, og helt á við skósmíði í nøkur ár. Í eini tvey ár var hann til skips, og arbeiddi so á landinum við ymist. So fór hann í holt við at umvæla

og gera róðrarbátar og størri seglbátar. Hegnismaður var, og hann varð av teimum, ið átti Vágsbotn, biðin at gera ein stóran bát. Hann var bygdur á Høgukai, framman fyri skeivapakkhús. Onkur mundi halda, at tað fór ikki at bera til, at fáa hann á sjógvin, men væl bar til. Báturin varð kallaður Eli eftir Liasi; hetta var í 1900. Hann fór í 1901 til Noregs at læra meiri. Han lærdi á ymsum byggistøðum skipasmíð, umvæling og tekning, og longu í 1902 var hann aftur heima. Í 1905 fekk hann sær verkstað í Álakeri, og kundi nú byggja før upp í 30 tons. Í 1917 varð fiskiskip til Ìslands upp á 50 tons bygt.

Lias kláraði at byggja 318 bátar, deksbátar og sluppir. Lias giftist við Katrinu Malenu, dóttir Sonnu á Kák og Andrass úr Koltri. Skjótt fekk hann andstreym á síni ferð á livshavinum. Tvey børn doyðu, tá ið tey vóru um ársgomul. Eisini var tað honum ein harður stoytur, tá ið sonurin Aksel fekk ta sjúku, ið seinri voldi hansara deyða.

Aðru ferð giftist hann við Kristinu, dóttir Sáru á Bakka og Jógvan Michelsen úr Tjørnuvík, tey fingu 3 synir. Hjá Liasi vóru tey 16 fólk í húsi, men væl gekst. Báðar konurnar vóru honum góðir stuðlar innanhýsis. Tey tóku eisini tvey børn í fostur. Lias bleiv bert 53 ár.




*Soleiðis sá Bauer kirkjan út innan.*

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

# Kol



*Her verður kolið koyrt í trillubørum til goymsluna. Hvat enn kann sigast um kol, tað var arbeiðsskapandi!*

**Í samband við umrøðuna av teimum 100 árunum fyri stovnanini av fyritøkuni hjá Valdemar Lützen kann tað vera uppá sítt pláss at lýsa umstøðurnar hjá arbeiðsfólki fyrr. Tí endurgeva vit brotið úr bókini "Lossingarmenn í Havn", sum umrøður kolalossing, sum var ein stórur partur av virkseminum hjá fyritøkuni.**

Lossing av koli var tiltikið skitið og strævið arbeiði. Fyritøkan hjá Lützen, sum lossaði sítt egna kol, syrgdi sjálv fyri at fáa fólk og hevði gjørt eina kolkai úr viði, ið stóð uppi summarmánaðirnar. Kolið varð hivað upp á kaiina, koyrt inn við trillubørum og síðan stoytt niður í kolgarðin.

Úti á Kaiini varð kol eisini lossað. Tað gekk fyri seg á sama hátt, at tey stóru kolstykkini í lastini vórðu tikin fyrst, rullað ella borin í eina jarnspann, ið hevði lás. Hetta var eitt serligt mál, ið varð hivað í land. Ansast skuldi eftir, at tey stóru kolstykkini ikki rullaðu á føtur og bein. Handskar vórðu ikki brúktir, og ansast skuldi eisini eftir, at fingrarnir ikki lógu ímillum. Fyrst varð grivið við spískum spakum fyri at fáa sett á at arbeiða seg niður, soleiðis at spannin kundi setast niður í eitt op í kollastini. Eitt sjakk upp á 3-4 mans kundi vera til hvørja spann, og sjakkini skiftust um at lempa upp í spannir. Sjakkini skuldu halda tørn, tí tá tóma spannin var á veg niður aftur í lastina, skuldi tann næsta standa klár at hivast upp.

Tá ið komið var á botn í lastina, niður á banjaran, varð lempað við flatum spakum, og tá gjørdist tað lættari at arbeiða. Upprunaliga brúktu teir kurvar, men so komu tær jarnspannirnar, ið vórðu lossaðar antin beinleiðis á lastbilar, har maður stóð og tók ímóti, ella upp á træbrúgv sum hjá Lützen, og kolið fór í trillubørum inn í kolgarðarnar á Kaiini. Seinni í tíðini fór kolið á lastbilar og tað varð stoytt útav niður á havnarplássið.

Niðri í lastini kundi ungur drongur setast til at renna millum spannirnar og krøkja í.

*"…tað var grúiliga skitligt, óalmindiliga skitligt, helst tað eingilska kolið.. tað var grúiliga gott kol, men forferdiliga skitligt…. og tað var eisini troyttandi og strævið at lossa tað kolið, tí tað var uppá tann mátan, at tú skuldi vera ferdigur at hava fylt málið, áðrenn hitt málið kom niður- …eg hevði millum annað til arbeiði at ganga ímillum bara høgga úr og í…tað brúkti man sovorðnar ungar til..og tað var so grúiliga tungt at fara at bera hendan her øgiliga krókin… gjarna var ein keta uppí.."*

Ein annar sigur frá, tá ein størri troldampari kom á Havnina:

*"..vit lossaðu ein damp-ara, ein stórur dampari…eg haldi vit vóru einar 10-12 dagar um at lossa hann, tá skuldu nógv fólk til..eg kann minnast, stadigvekk, tað var illveður, tað var regn næstan hvønn tann einasta dag…og so var tað eingilskt kol, so tað sá næstan úr sum vit vóru nekarar, sum arbeiddu umborð, allir líka svartir…"*

Menn, sum lossaðu kol, vóru eisini settir til at bunkra skip. Í gomlum døgum, tá eingin krani var, bóru teir samb. heimildum kol í leypi umborð á eitt nú "Smiril". Damparanir komu regluliga. Bæði skip og hús brendu kol fram til 1950-árini, tá so var farið at brúka olju sum brennievni.

Menninir sum lossaðu kol vóru lættir at kenna aftur. Tá ið tað regnaði varð sagt, at bara tað hvíta í eygunum sást, tá ið teir komu heim eftir kaiini.

Hóast skitið arbeiði var kolið góð lossing at fáa. Damparanir lógu inni eina viku ella longur, og kolið kravdi vanliga nógvar mans.




*Hesir lastbilarnir við áskriftini "Kul, koks og brænde" vóru ímyndin av Valdemar Lützen.*

SEV

## MASKINVERKFRØÐINGUR søkist til ELFELAGIÐ SEV

Eitt starv sum maskinverkfrøðingur á Framleiðsludeildini hjá SEV er leyst at søkja til setan frá uml. mars - apríl 2005.

**Starvið:**
Framleiðsludeildin hevur um hendur øll framleiðsluverkini hjá SEV.

Hesi umfata í løtuni diesel-, vatn- og vindorkuverk. Framleiðslan hjá SEV var í fjør hendan:
Dieselorka 147.026 MWh
Vatnorka 94.387 -
Vindorka 567 -

Mesta lastin var í fjør 41 MW í meginøkinum og 4,9 MW í Suðuroy.

Framleiðsludeildin hevur yvirskipaða ábyrgd fyri og eftirlit við rakstri av framleiðslueindunum. Ætlanin er, at tann, ið settur verður, skal kunna luttaka í øllum uppgávunum hjá deildini, eisini nýgerð av framleiðsluverkum.

Starvsstaðið er skrivstovan hjá SEV í Tórshavn, men við tað, at framleiðslueindirnar eru spjaddar um alt landið, skal roknast við nakað av ferðing í arbeiðsørindum, m.a. til Suðuroyar og til útoyggjar.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at viðkomandi hevur í minsta lagi prógv sum maskinverkfrøðingur á sama støði sum teknikumverkfrøðingar frá donskum lærustovnum.

Arbeiðsroyndir á verkfrøðingastøði - serstakliga innan dieselmotorar - geva fyrimun.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Verkfrøðingafelag.

Afturat skalalønini verður veitt ein viðbót, sum m.a. verður ásett eftir kvalifikatiónum og starvsroyndum.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Bjarka Hermansen, deildarstjóra á tlf. 346800.

**Umsóknarfreist v.m.**
Umsóknir skulu saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum sendast til **Elfelagið SEV, Box 319, 110 Tórshavn** og skulu vera SEV í hendi **í seinasta lagi tann 28. februar 2005.**

SEV

## MASKINMEISTARI søkist til ELFELAGIÐ SEV

Eitt starv sum maskinmeistari á Sundsverkinum, er leyst at søkja til setan frá umleið mars/apríl 2005.

Starvið er leyst í samband við eitt farloyvi, og verður setanin tí avmarkað at galda til 1. oktober 2006.

**Starvið:**
Sundsverkið hevur 5 dieselmotrar upp á tilsamans 46,7 MW. Brennievnið er tungolja.

Maskinmeistaraarbeiðið umfatar rakstur og hald av Sundsverkinum, bæði sum dagarbeiði og sum vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Uttanfyri vanliga arbeiðstíð eru altíð tveir maskinmeistarar á vakt á Sundsverkinum, ein vaktmeistari og ein 2. maður á vakt. Lýsta starvið umfatar luttøku í vaktini sum 2. maður á vakt.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar við fullari maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv hava fyrimun, men er full maskinmeistaraútbúgving tó ikki ein treyt.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Lønin verður ásett eftir útbúgving og starvsaldri frammanundan.

Fyri umsøkjarar við fullari maskinmeistarútbúgving er lønin sambært 4. lønarflokk

Byrjunar- og endalønin í 4. lønarflokki er í løtuni netto ávikavist kr. 22.106,48 og kr. 23.798,31 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi tilsamans ávikavist kr. 2.763,31 og kr. 2.974,79 um mánaðin.

Umframt nevndu løn kann roknast við vaktargjøldum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn.

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum verða send **Elfelagnum SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn** og skulu vera SEV í hendi **í seinasta lagi tann 28. februar 2005.**

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Jákup Sørensen, verksmeistara á Sundsverkinum ella til Bjarka Hermansen, deildarstjóra á Maskindeildini, báðir á telefon nr. 346800.

# Minningarhaldið í Newcastle

Sum vit fyrr hava greitt frá, verður 8.mai minningarhald í Newcastle í samband við, at 60 ár eru liðin síðan 2. heimsbardagi endaði. Í hesum sambandi verða uttan iva nógv minningarhald í londunum, sum vórðu rakt av hesum ragnaroki, og her vóru Føroyar jú eitt av teimum.

Fyrireikararnir av danska hátíðarhaldinum bjóða eisini føroyingum at verða við.

Skráin er henda:

Sjálvt hátíðarhaldið verður sunnudagin 8. mai, men roknað verður við, at gestirnir koma 6. ella 7. Tann 7. verður fyriskipað ein samkoma fyri luttakarunum.

Minningargudstænastan verður í St. Nicholas Cathedral 8.mai kl. 12, har Københavns Drengekor fer at syngja. Kransar verða lagdir við bretsk og donsk minnismerki. Tað verður eisini donsk flotavitjan. Millum luttakararnar verður danski sendimaðurin í London og borgmeistarin í Newcastle. Uttan iva verður okkurt føroyskt íkast, men hetta er tó ikki fastlagt enn.

Aftaná gudstænastuna verður móttøka og um kvøldið verður døgurði.

Skipað verður fyri pakkaferð til Newcastle, har farið verður úr Føroyum umvegis Aberdeen til Newcastle fríggjadagin 6.mai og komið verður aftur mánadagin 9.mai um Keypmannahavn. Áhugað eiga skjótast gjørligt at venda sær til Faroe Travel, tlf. 31 2600.

**FF-blaðið**
www.fiskimannafelag.fo

Vit hava útgerðina til trol- og nótaflotan



Flótitrol
Botntrol
Rækjutrol
Snurpunótir

VÓNIN

Høvuðsskrivstova:
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 444 246
Telefax 444 579

Tórshavn:
Viðarnes
100 Tórshavn
Telefon 354 391
Telefax 313 319

info@vonin.com - www.vonin.com

BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

Pf. Petur Larsen
Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

# Dagbókin hjá Bernhard, 1. partur

**Í fyrsta partinum kunnu vit lesa fyrst um heimalívið í 1930 hjá tí 27 ára gamla Bernhard. Tað er ein blanding av gerandisdegi og andaligum virksemi. So nærkast tíðin at fara til skips, meðan verkfall hóttir. Men farið verður uttan at viðurskiftini eru greidd við gentuna, hann er góður við. Men hann fær so sent henni bræv áðrenn loyst verður. Leiðin gongur til Íslands eins og hjá nærum øllum arbeiðsførum monnum og dreingjum.**

**At taka úr blaðnum**

Síðurnar 9, 10, 15 og 16 kunnu takast úr blaðnum

## Dagbókin hjá Bernhard

Seinasta summar høvdu vit frásøgn um "Nólsoy", sum gekk burtur í 1934. Ein av monnunum sum umkomst, og sum var tann einasti sum fekk grøv, var Bernhard Henriksen úr Sandavági. Í hesum sambandi greiddu vit eisini frá dagbókini hjá honum. Hon er frá árinum 1930. Bernhard hevur skrivað niður fyri hvønn dag í árinum tað, sum hann hevur upplivað, t.v.s. bæði á landi og sjógvi. Hetta er tískil ein samtíðarsøga frá einum tíðarskeiði, sum liggur 75 ár afturi í tíðini. Her fæst eisini ein mynd av eini persónligheit, sum vit eisini fáa váttað av teimum, sum minnast hann.

Bernhard var virkin missiónsmaður, og hann var eisini blákrossari. Hann var sera fittur í hondunum og m.a. bant hann bøkur inn, tá hann var heima.

Dagbókin hjá honum er eisini um kærleikssøgu hansara. Hann hevði hug á Onnu, men fekk ikki sagt tað við hana, áðrenn hann fór til Havnar at rigga til at fara til skips á vári 1930. Dagin fyri, at teir fara avstað, sendir hann henni bræv um hetta. So túrurin gekk við at hugsa um, hvat svarið mundi fara at vera. Tá hann kemur heim aftur, vísir tað seg, at hon hevur somu hugsan sum hann, og Bernhard kann nú kalla seg forlovaðan.

Hann fer avstað aftur, og nú er spenningurin at fáa bræv frá gentuni. Men túrurin kemur til enda, og teir fara heim uttan, at hava verið inni har, sum brøvini eru send! Víst er nógv broytt, nú teir umborð á "Skálaberg" kunnu sita og chatta við gentuna yvir alnótina.

Frásøgnin hjá Bernhard er ein einastandandi lýsing av lívinum umborð á eini slupp og umstøðunum tá. M.a. greiðir hann frá teirri stóru broyting, tá teir fingu radio umborð, og tað bar til at lurta eftir sendingum ymsastaðni frá í heiminum.

Bernhard greiðir eisini frá, hvussu hann sum fiskimaður upplivdi sáttmálasamráðingarnar í 1930, tá tað veruliga var útlit fyri verkfalli. Men semja gjørdist og teir fóru avstað, sum ætlað.

Tað sum eisini lýsir lyndið hjá Bernhard, er, at fyri dag hann skrivar endar hann við: "Alt væl".

Hetta árið í 1930 var Bernhard við "Suðuroy", sum eisini var eitt skip hjá Müllerreiðaríinum. Skiparin var tann sami, Hans David Hansen, so teir eru farnir saman av "Suðuroy" umborð á "Nólsoy".

Vit fara nú at prenta dagbókina mestsum orðarætta, og er 1.partur í blaðnum hesa ferð. Vit ivast ikki í at hetta er áhugaverdur lesnaður hjá teimum, sum hava áhuga fyri slíkum tilfari.



*Bernhard, sum hevur skrivað dagbókina.*



*Skiparin var Hans David Hansen úr Hósvík, sum í 1934 saman við Benhardi gekk burtur við Nólsoynni.*

**Mikudagur,**
**1. januar 1930**
Eg var í kirkju fyrst. Kl. 7 seinnapartin var Blákrossfest í Meinigheitshúsinum "Saron". Festin var góð. Vit høvdu tríggjar limir av bygd. Enok, chauførurin, systur hansara og bróður. Festin endaði ikki fyrr enn eftir midnátt. Veðrið var gott - ættin høgur vestan. Til festina vóru millum 70 og 80 fólk, so hon var góð.

**Hósdagur,**
**2. januar 1930**
Fór ikki tíðliga upp, sum verða man. Fyrsta rendi var í Meinigheitshúsið at rigga av. Vit kókaðu okkum drekka og tóku av borðinum og vaskaðu upp.

Vit vóru næstan liðug, tá konufólkini komu norður.

So var stríðið at fáa alt, sum lánt var, aftur til sættis.Tað er altíð tað ringasta stríðið. Veðrið var gott, ælaði av og á. Um kvøldið var áarføri av høgum vestri.

**Fríggjadagur,**
**3. januar 1930**
Havi bara pjøkast við sovorðið smávegis. Í kvøld havi eg fingist nakað við bøkur. Ættin er útsynningur í dag, og í kvøld liggur hann hægri.Alt væl.

**Leygardagur,**
**4. januar 1930**
Gott veður í dag, okkurt æl av og á. Ættin er høgur vestan. Í dag havi eg bundið inn aftur.

**Sunnudagur,**
**5. januar 1930**
Óveður í dag. Kavarok og stormur. Ættin er norðan. Havi verið í kirkju í dag. Har var lítið fólk og ógvuliga kalt.Var eisini á møti í kvøld. Vit høvdu kokkagildi hjá Josefinu. Nokkso fittligt. Skjótt endaðu vit okkara veitslu, o.u. kl. 10 fóru vit hvør til sín.

**Mánadagur,**
**6. januar 1930**
Gott veður. Havi verið útrógvin.Vit fingu 306 pund.

Eitt lot av landnyrðingi var seinnapartin í dag. Hetta er fyrsta ferð, eg havi verið útrógvin á hesum hátíðardegi.Tað er so undarligt fyri mær. Alla mína tíð hevur trettandi dagur verið ein høgtíðsdagur fyri mær eins og aðrir jóladagar. Her bleiv hann eisini hildin allan dagin fyrr.Tað er ikki fyrrenn í tí seinastu tíðini, at tey ikki hava farið í kirkju fyrr enn um kvøldið.

Thor giftist í kvøld. Grøn var í kirkjuni. Tað ringdi, áðrenn vit komu á land. Brúðarparið fór í kirkju, tá vit høvdu avreitt. Góða lukku,Thor.

**Týsdagur,**
**7. januar 1930**
Í dag havi eg tikist við eitt og annað. Eitt sindur havi eg fingist við at bundið inn. Í dag hevur verið ilsligt veður. Fyrst vátakavi, og síðani hesin váti heglingurin. Nú er vindur komin av útsynningi. Alt væl.

**Mikudagur,**
**8. januar 1930**
Í dag havi eg fingist við at gjørt mær eina bókreol. Tað er betur at hava bøkurnar standandi í henni, enn at tær skulu liggja og sløðast hist og her á gólvinum. Veðrið var toluligt fyrrapartin, nakað av vindi av útsynningi suðri. Seinni bleiv tað stormur og regn sama vegin. Veðrið er frægari í kvøld, ættin er sunnan.Alt væl.

**Hósdagur,**
**9. januar 1930**
Veðrið kann sigast at hava verið gott í dag, men nakað ilsligt at arbeiða úti.Vit hava í dag arbeitt uppá vegin, tað vóru nokk so ring vátakavaæl við hvørt. Í kvøld havi eg skriva bræv.Alt væl.

**Fríggjadagur,**
**10. januar 1930**
Arbeitt uppá vegin í dag. Tað var kalt at arbeiða í fyrstani, tí tað var fryst. Ættin var vestan.

Hans Dávid er komin í dag, so nú má eg aftur lova meg til skips. Hann skal í ár hava "Suðuroy". Hon sigst at verða eitt gott skip, men deyðsiglari.Alt væl.

**Leygardagur,**
**11. januar 1930**
Í dag havi eg aftur arbeitt uppá vegin.Tað var ilsligt veður í dag, grov heglingsæl av og á. Ættin var útsynningur. Í kvøld kom regn. Var til biðimøti í "Saron" í kvøld.Alt væl.

**Sunnudagur,**
**12. januar 1930**
Tað hevur verið ógvuliga kalt í dag. Ættin er útnyrðingur. Var í kirkjuni í dag og á møti í kvøld. Veðrið er av tí allar besta í kvøld, mánalýsi - eitt vakurt kvøld.

**Mánadagur,**
**13. januar 1930**
Gott veður, ættin er norðan. Havi arbeitt uppá vegin, tað gekk gott.

Í kvøld havi eg fingið fjallboð, eg eigi bara ein um árið. Tað er veðurgjólingsdagurin á Steig. Tað sær út til at blíva gott veður í morgin, so tað verður nokk ein góður sportdagur.Alt væl.

**Týsdagur,**
**14. januar 1930**
Havi verið á fjalli.Tað var nokk so strævið. Eg var við at leiða heim av syðraseyði. Vit komu til hús, áðrenn teir komu í rætt við hálsagonguni. Veðrið var frálíka gott, eitt lot høgt. Í kvøld rekur hann spakuliga eysturá.

**Mikudagur,**
**15. januar 1930**
Hetta hevur verið tað, sum tey plaga at rópa ein rókarins dagur.

Fyrst í morgun, eg havi verið útrógvin. Tá vit komu á flot, lak báturin so illa, at vit mundu ongantíð fingið hann í gongd. Vit fóru so nakað út í vágna og vendu so innaftur, løgdu okkum so at tetta. So hildu vit avstað aftur, men hann var ikki í ordan. Vit fiskaðu lítið, 2 kr. 20 oyru í part. Tá vit lendu í kvøld komu vit tvørir á støðni.Tað rullaði eitt sindur, hann fyltist ikki, men hetta var kortini ein keðiligur dagur. Alt væl.

**Hósdagur,**
**16. januar 1930**
Gott veður í dag. Nakað av vindi av landnyrðingi. Eg havi verið útrógvin.Vit fiskaðu gott 300 pund. 6 mans vóru við.Tað er føðingardagur hjá Valborg. Í kvøld havi eg fingist við bøkur.Alt væl.

**Fríggjadagur,**
**17. januar 1930**
Í dag er óveður, regn og stormur av suðuri. Eg havi gjørt lítið og einki í dag, fingist eitt sindur við bøkur.Alt væl.

**Leygardagur,**
**18. januar 1930**
Óveður í dag. Stormur av útsynningi og brim. Eg havi grivið eitt sindur, síðani havi eg bundið inn. Alt væl.

**Sunnudagur,**
**19. januar 1930**
Var í kirkjuni og til møti í kvøld.Tað er vánaligt veður, stormur og regn av útsynningi.Alt væl.

**VERKFAL HJÁ FISKIMANNAFELAGNUM**

**Mánadagur,**
**20. januar 1930**
Í dag hevur veðrið verið gott. Ættin er tann sama. Eg havi fingist við bøkur í dag. Í kvøld var møti fyri fiskararnar. Tað eru tvey uppskot komin til kontrakt, eitt frá Fiskimannafelagnum og eitt frá Reiðarafelagnum. Tað frá reiðarunum fekk sjálvsagt onga stemmu. Vit streyka. Alt væl.



*Tað er frá Hannebeth Joensen, at vit hava fingið dagbókina. Bernhard var mammubeiggi hennara. Hon er uppkallað eftir báðum mammubeiggjunum, sum gingu burtur við Nólsoynni, Johannus og Bernhard.*

Framhald á næstu síðu


APRIL, 1930.
Friday 25
(115-250)
Fóru út kl 7 í morgun. Silgdu í Faksabúktina. Tað var væl av vindi ... Nú er næstan stilli, ættin er norðan. Vit síggja einki skip. Vit hava fingið o. u. 1200 Fisk.
Alt væl

*Brot úr dagbókini.*



*Á Steig kemur fleiri ferðir fyri í frásøgnini. Løgmansgarðurin og húsini hjá Óla Jákup á Steig er vinstrumegin. Húsini hjá Suðuroyar-Dánjali eru høgrumegin. Drongurin er Hergeir Christiansen. Myndin helst frá 50-unum.*

**Týsdagur, 21. januar 1930**
Eg havi bundið inn í dag. Síðani havi eg lisið. Tað er altíð nakað at lesa hjá mær nú. Veðrið hevur verið toluligt, ættin er landsynningur sunnan, regn av og á, og brim. Alt væl.

**Mikudagur, 22. januar 1930**
Fyrrapartin havi eg grivið garnar. Í kvøld havi eg bundið inn. Veðrið hevur verið gott eitt fleyr av landsynningi. Alt væl.

**Hósdagur, 23. januar 1930**
Gjørt mest sum einki, bíða eftir vørum, men ongar komu. Eg havi samlað uppí fýra byrðar av skervi til eplakassan. Í kvøld havi eg bundið inn. Ættin er landsynningur. Alt væl.

**Fríggjadagur, 24. januar 1930**
Veðrið hevur verið gott. Ættin landsynningur. Bundið inn í morgun. Í dag havi eg fingist við vatnið, lagt rørini inni hjá okkum, nú rennur, nógv er ímillum. Í kvøld havi eg so aftur fingist við bøkur. Alt væl.

**Leygardagur, 25. januar 1930**
Havi bundið inn í dag. Veðrið hevur verið gott, mest stilli, tó okkurt æl av og á, eitt lítið gul av landsynningi í kvøld. Alt væl.

**Sunnudagur, 26. januar 1930**
Var í kirkju og til møti í kvøld. Veðrið er gott, ættin er útsynningur. Tað eru fleiri fullir í kvøld.

**Mánadagur, 27. januar 1930**
Veðrið er gott í dag. Fingist við bøkur. Ættin hevur verið vestan, nú er stilli, avkláring. Alt væl.

**Týsdagur, 28. januar 1930**
Gott veður fyrrapartin í dag. Seinnapartin vindur av landsynningi. Eg havi smíðað fyrrapartin og bundið inn í kvøld. Alt væl.

**Mikudagur, 29. januar 1930**
Eg havi í dag gjørt nakað, sum eg ikki havi gjørt fyrr. Eg havi sett ein vev hjá Nicolinu upp. Tað gekk bara gott. Veðrið hevur verið gott, ælað við hvørt, ættin er landsynningur. Alt væl.

**Hósdagur, 30. januar 1930**
Eg havi aftur í dag verið á Steigini og smíðað. Eg havi gjørt borð í køkinum hjá farbróður, har hevur verið eitt sindur trist. Teir hava gingið inn at smakkað sær á av og á. Veðrið var gott á landi, men óðnarveður á sjónum, nógv brim. Ættin var landsynningur. Alt væl.

**Fríggjadagur, 31. januar 1930**
Havi aftur verið og smíðað í Steigini. Veðrið hevur verið gott, ættin er nú eystan. Hann hevur ælað við hvørt, men millum ælini hevur sólin sæð. Eg havi aftur í dag verið og smíðað hjá farbróður. Teir hava fingist við vatnið. Alt væl.

**Leygardagur, 1. februar 1930**
Havi aftur í dag verið á Steigini og smíðað. Veðrið hevur verið gott, eitt lot av landnyrðingi, kalt í veðrinum. Tað er hjá farbróður, ið eg havi smíðað. Alt væl.

**Sunnudagur, 2. februar 1930**
Veðrið av tí allar fínasta. Eg var í kirkjuni. Síðani var eg á møti í Meinigheitshúsinum. Sólskin og stilli. Alt væl.

**Mánadagur, 3. februar 1930**
Havi í dag verið útrógvin. Ilsligt veður, vindur av og á og ælingur av eystri. Fiskurin varð lítil, okkurt um 200 pund. Alt væl.

**Týsdagur, 4. februar 1930**
Aftur verið útrógvin. Vit vóru í dag vestanfyri og fingu o.u. 400 pund. Tað var kalt í dag, ælaði illa av landsynningi. Alt væl.

**Mikudagur, 5. februar 1930**
Gott veður í dag. Bátarnir vóru útirógvnir, men eg havi ikki verið við. "Rex" kom aftur í dag. Hevur fingið motorskaða. Eg havi í dag arbeitt uppá bøkur. Eitt lot av landnyrðingi. Alt væl.

**Hósdagur, 6. februar 1930**
Tað var fínt veður í dag. Ættin landnyrðingur. Bátarnir útirógvnir, men eg var ikki við. Eg havi aftur í dag fingist við bøkur. Alt væl.

**Fríggjadagur, 7. februar 1930**
Havi í dag verið útrógvin. Eitt lot av útsynningi. Fiskaðu o.u. 450 pund. Gott veður. Alt væl.

**Leygardagur, 8. februar 1930**
Gott veður, eitt lot av útsynningi. Fyrrapartin í dag havi eg grivið garnar. Nú seinnapartin fingist eitt sindur við bøkur. Tað var eisini biðimøti, har var eg við. Alt væl.

**Sunnudagur, 9. februar 1930**
Var í kirkju og til altars og á møti í kvøld. Ættin er útsynningur vestan, hann ælar við hvørt. Alt væl.

**Mánadagur, 10. februar 1930**
Eg havi í dag fingist við at smíða okkum eitt kapakuffert. Síðani havi eg verið á Steigini eina løtu og á vali. Tað er kommunuval í dag. Veðrið er gott, ættin er útsynningur. Alt væl.

**Týsdagur, 11. februar 1930**
Veðrið er toluligt í dag, nakað av vindi av útsynningi. Eg havi tikist við ymiskt í dag, og í kvøld havi eg fingist eitt sindur við kufferti. Alt væl.

**Mikudagur, 12. februar 1930**
Eg havi aftur í dag fingist við kuffertið. Eg var einaferð í dag inni á fabrikkini í Miðvági. Eg skuldi fáa mær polsturseym og annað til tað, men har gjørdist lítið og einki. Nakrar seymir fekk eg so eg hjálptist. Síðani keypti eg mær hjørnir, men tey brúkti eg ikki. Veðrið er gott, nú er eitt lot av útsynningi og regn. Alt væl.

**Hósdagur, 13. februar 1930**
Hann er sunnan í dag til ein avveksling og sjálvsagt regn, tað hoyrir jú til, men ellers er veðrið sum tað kann. Eg havi aftur




*Suðuroy.*

**Framhald á síðu 15**

VÆLKOMIN Á FISKIVINNUSKÚLAN :)

Vit bjóða eina 3-ára yrkisgymnasiala útbúgving, sum gevur atgongd til víðarigangandi útbúgvingar og hægri lærustovnar. Tú kanst eisini fara beinleiðis í starv í vinnuni.

Tey, sum heldur ynskja at fara í læru í fiskaídnaðinum ella í alivinnuni, taka støðisárið á skúlanum.

**Ring ella send okkum teldupost og fá meira at vita!**



FISKIVINNUSKÚLIN ER M.A. KENDUR FYRI:

EUROPEAN BUSINESS GAME

*Europameistarar tvær ferðir í kappingini "European Business Game"*

KÓKIBÓK

*Metsøla av kókibókini "Góður matur úr sjónum," sum næmingarnir gjørdu*

VERKÆTLANIR

*Spennandi verkætlanir*

YMISKT

*Fiskamarknaður og spennandi uttanlandsferðir*

EITT ØÐRVÍSI VAL...

WWW.FISKVEST.FO

FISKIVINNUSKÚLIN

Postrúm 96, 350-Vestmanna, Tel. 424573 & 424496, Fax 424428
fiskvest@fiskvest.fo, www.fiskvest.fo

VASTI 457171

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 336 - 17. februar 2005

## Tí tapti javnaðarflokkurin í Danmark:

# Vit hava tosað við "frágreiðingina"

Sum kunnugt tapti danski javnaðarflokkurin fólkatingsvalið í seinastu viku. Hetta hendir eftir, at flokkurin eisini tapti valið í 2001, og tað er langt síðan at flokkurin hevur fingið so lítla undirtøku. Meðan flokkurin í stórum parti av seinastu øld var størsti flokkur í Danmark, sum eisini hevði stjórnarvaldið stóran part av tíðini, er hetta nú broytt.

Frágreiðingin er tann, at meðan arbeiðarar fyrr fylktust um javnaðarflokkin, tí hann varð roknaður at vera teirra trygd, og eisini hevur verið tað, so er hetta fyribrigdi broytt. Lutvíst eru ikki so nógvir "arbeiðarar" í gamla týdningin av orðinum. Øll eru serarbeiðarar av onkrum slagi. Og nógvir av gomlu veljarunum eru farnir at velja aðrar flokkar. Ein stórur partur er eisini farin at velja Dansk Folkeparti, sum verður mettur at vera sera høgravendur, men í sosialum spurningum verður hann av mongum roknaður at vera meira "sosialur" enn sjálvur javnaðarflokkurin.



*Her eru Karin og Arvin Storgaard uttanfyri teirra íbúð í Berggrensgade 18 beint við Svanemølle station. Tey búgva í einum serligum býarparti, sum fyrr hevur verið umrøddur her í blaðnum. Upprunaliga vóru her arbeiðaraíbúðir, sum tá tær vórðu bygdar, bóru boð um nýhugsan, har tað eisini varð hugsað um umhvørvið.*
*Tey hava góðar møguleikar at verða kunnað um Føroyar, tí teirra næstu grannar eru Føroyavinir um ein háls og fylgja við gongdina her m.a. gjøgnum FF-blaðið.*

**Hví flyta javnaðarfólk yvir til Dansk Folkeparti?**

Tað er ein áhugaverdur spurningur, hví hetta er so. Og her eru vit í teirri hepnu støðu, at vit undan valinum tosaðu við eini hjún, sum meiri enn nakar annar eru ímynd av svarinum uppá hendan spurningin.

Hjúnini eru Arvin og Karin Storgaard, ið búgva á Østerbro í Keypmannahavn. Tey hava stóran part av lívið sínum verið virkin í danska javnaðarflokkinum, og hetta var júst grundað á, at flokkurin var flokkur teirra veiku. Í 1985 varð Karin vald í býarstýrið í Keypmannahavn, Københavns Borgerrepræsentation, fyri javnaðarflokkin.

Her kom hon í fyrsta umfari at arbeiða undir "býarkonginum" Egon Weidekamp. Hann var dugnaligur politikkari, men ein "pampari" sum nakar. Tá hon kom inn sum nýggjur býráðslimur, fekk hon at vita, at tey fyrstu fýra árini ráddi um at halda seg kúrran og at siga sum minst. Hetta kann vera torført hjá fólki sum vilja nakað og tað skjótt!

Seinni gjørdist Jens Kramer Mikkelsen borgarstjóri, og serliga tá vísti tað seg at vera trupult at halda tað, sum lovað varð til valið.

Undan valinum varð lovað bæði gull og grønar skógir á sosiala økinum, og øll vita, at eldraøkið er sera kostnaðarmikið, serliga í einum býi sum Keypmannahavn, har tað eru upp á seg fleiri gomul enn ung.

Men tá vallyftini skuldu setast í verk, vóru ikki ráð til nakað av tí lovaða. Stórur tørvur var á røktarheimum, men eingi ráð vóru til at byggja fyri. Tað var enntá so galið, at røktarheim máttu leggjast niður.

Tað gjørdist meira og meira ørkymlandi, at tað skuldi vera so stórur munur millum orð og gerðir. Og ein dagin var so bikarið fult, tá aftur eitt røktarheim skuldi steingjast.

Í 2000 tóku bæði Karin og Arvin tað stóra stigið at taka seg úr javnaðarflokkinum og limaðu seg inn í Dansk Folkeparti. Hetta var eitt ordiligt lop, men Karin hevur ikki angrað tað og hevur ikki havt teir trupulleikar sum kundu væntast. Sjálvt javnaðarfólk hava sagt, at tey skilja hennara sjónarmið, sjálvt um tey eru ósamd. Men tað hevur nevniliga víst seg, at Dansk Folkeparti í nógv størri mun livir upp til rættan "gamlan" javnaðarpolitikk. At tað uttan iva er taktikkur aftanfyri er ein onnur søk.

Sum parlamentariskt grundarlag hjá verandi stjórn hevur Dansk Folkeparti sera stóra ávirkan. Og hesa nýtir flokkurin til júst at gera nakað fyri tey gomlu. Eitt úrslit av hesum er tann sokallaði eldrakekkurin, sum gevur einum stórum parti av teimum eldru einar kr. 4.000 eyka árliga eftir skatt. Ætlanin er í komandi valskeiði at víðka hesa skipan, so hon lutvíst skal geva meira og eisini skal latast til fleiri.

Herafturat verða fleiri pengar settir av til eldrarøkt. Tískil er tað Dansk Folkeparti, sum fyri ein stóran part í praksis hevur yvirtikið umsorganina fyri teimum eldru frá javnaðarflokkinum, sum helt seg hava patent uppá hetta.

Hetta er so orsøkin til, at so nógvir gamlir javnaðarveljarar hava vent flokkinum bakið og eru farnir til Dansk Folkeparti.

Hetta átti at givið javnaðarflokkinum høvi til sjálvrannsakan, sum við sínum pamparaveldi flytir seg meira og meira frá vanliga fólkinum. At hetta eisini átti at givið føroyska javnaðarflokkinum nakað at hugsa um, er ein onnur søga.

**Lovar meira enn hann kann halda**

Karin stillaði upp til fólkatingsvalið, men hon gjørdist júst ov stutt til at koma inn. Tí kemur hennara politiska arbeiði framyvir at liggja í býarstýrinum.

Her kann eisini vera nóg mikið at tríva í, tí her er hon formaður fyri býráðsbólkin hjá Dansk Folkeparti og er hetta eisini ein spennandi uppgáva.

Tað áhugaverda er, at ein býur sum Keypmannahavn verður stýrdur við einum magistratstýri. T.v.s. at teir ymisku borgmeistararnir fyri hvørt sítt øki verða býttur millum allar flokkar eftir atkvøðutali. Tí fáa allir flokkar ávirkan í mun til støðd. Meira demokratiskt kann tað neyvan vera.

Tó skal yvirborgmeistarin veljast av einum meiriluta. Hetta starvið hevur javnaðarflokkurin átt í nógv ár. Seinastu 15 árini hevur tað verið Jens Kramer Mikkelsen, sum á sín hátt hevur verið ein góður maður í hesum starvi.

Men sum so nógvir aðrir politikkarar lovar hann meira enn hann kann halda. Og tá hann skal svara fyri seg, sendir hann altíð onkran annan. sum kann taka skrædlið.

Hetta gav at býta, tá hann gav einum borgmeistara - einari kvinnu - sekkin aftaná seinasta býráðsval. Trupulleikin uppstóð, tí hann frammanundan hevði sagt henni, at hon skuldi halda áfram, men hetta hevði hann ongantíð ætlað. Hann var ikki so frægt maður at siga henni tað frammanundan. Viðkomandi gav tí ilt av sær so tað munaði.

Kramer Mikkelsen hevur verið fremsti talsmaður fyri Metroina - undirgrundarjarnbreytina, sum nú er komin í Keypmannahavn. Ein slík kostar sjálvsagt ein hóp av peningi. Fyri íbúgvararnar er tað av týdningi, at øll breytin veruliga er undir jørð, so íbúgvararnir kunnu sleppa undan ganginum og órógvinum, sum standast av at hava tok koyrandi millum húsini.

Í hesum sambandi hevði Kramer m.a. lovað íbúgvarunum á Amager, at breytin veruliga skuldi vera undir jørð, men tá avtornaði, hava teir uttan iva funnið út av, at teir kundu spara nógvan pening við ikki at halda hetta lyfti. Hetta hevur skapt stóra misnøgd hjá raktu íbúgvarunum, og lítið restaði í at hetta gav Karin sess á fólkatingi.

Kramer helt, at nú hevði hann tænt sína verndarskyldu í politikki. Hann fór nú til eitt meira ópolitiskt arbeiði. Hetta fekk hann sum stjóri í tí felagnum, sum rekur Metroina. Tá tíðindini um hetta komu út, gjørdist rættiligt rok, tí her kundi talan vera um ein rossahandil. Men Karin tekur ikki hetta so tungt, tí hon metir Kramer at vera rætta mannin til hetta arbeiði.

**Møguleikin hjá Britt Bjerregaard**

Kommunuval verður í Danmark í heyst, og uppskotið hjá javnaðarflokkinum til borgmeistarastarvið er tann kenda Ritt Bjerregaard. Tað verður sera spennandi at vita, hvussu hetta fer at gangast. Javnaðarflokkurin hevur sum er bert 17 av 55 býráðslimum, so her krevst undir øllum umstøðum stuðul frá øðrum flokkum. Tað kann tala ímóti henni, at hon ikki er úr Keypmannahavn og hon verður heldur ikki roknað at vera løtt at samstarva við. Men tað sum talar fyri hennara møguleikum er, at fremsta mótvalevnið er vinstramaðurin Søren Pind, sum ikki er serliga væl umtóktur. Annars er hann júst valdur í fólkatingið, og tað mugu tó vera mørk fyri, hvussu nógv størv fólk kunnu klára.

Men fyri at venda aftur til Karin. Hennara næstu grannar eru meira at kalla vinstrahallir, og teir meta seg avgjørt ikki at hava nakað til felags við Dansk Folkeparti. Tey hava tó tað álit á Karini, at í henni bankar framvegis eitt javnaðarhjarta, ið tekur hond um tey veiku í samfelagnum. Hesi hava brúk fyri stuðuli úr øllum flokkum.

Henda vón tykist ikki at vera til fánýtis. Annars eiga Karin og Arvin 2 børn og trý barnabørn.




*Nógv stríddust til fánýtis at koma á fólkating. Millum hesi vóru Kristendemokraterne, sum her býta appelsinir út á Ráðhúsplássinum.*

# Minningarorð um vin mín Tummas Paula Mortensen

Hóskvøldið sá eg í portalinum, at ein 55 ára gamal maður var deyður av roykeitran úti á Argjum. Hugsaði um, hvør tað mundi verða, tí hann var á sama aldri sum eg. Skuldi ringja heim leygardagin fyri at vita hvør maðurin var.

Í gjárkvøldið bjóðaði eg tveimum føroyingum, sum sigla við trolara her, niðan til mín at eta. Vit prátaðu um mangt og hvat. Eg fór á lofti eftir nøkrum eldri myndabókum. Har ímillum vóru nakrar myndir av Tummas Paula, sum eg fortaldi teimum var ein av mínum vinum á Argjum. So rópar kona mín, at maturin stendur á borðinum, og vit settust við borðið. Vóru akkurát byrjaðir at eta, tá ið telefonin ringir. Tað var mamma mín, ið segði at hon hevði eini ring boð at bera mær. Hon segði at tað var Tummas Pauli, ið deyður var. Verðin er løgin, tí myndabókin lá inni í stovuni við myndum av Tummas Paula.



Eg kom at halda saman við Tummas Paula og Sæmund frá ungum aldri. Vit tríggir hava havt manga ógloymandi løtu saman, og sum tað var hugnaligt at koma inn til Sverra og konuna, har var blíðskapur, tað skulu tey eiga.

Tummas Pauli og eg vóru mangan túrin við bátinum hjá Sverra, og fingu vit ofta nógvan lomviga. Vóru ofta vestur úr Trøllhøvda og onkuntíð so langt vesturi, at vit høvdu Mykines fjørð opnan, og so norðuri á Grunninum innan fyri Koltur. Har var altíð nógvur svartfuglur at fáa.

Onkuntíð vóru foreldrini hjá Tummas Paula bangin um okkum. Eg minnist serliga tveir túrar vit høvdu saman. Høvdu verið vestan fyri Trøllhøvda og skotið fugl og vóru á veg aftur til Argir. Ímillum Kirkjubønes og Glyvursnes sigur Tummas Pauli, at okkurt var aftan fyri bátin. Um tað var ein brugda ella ein hemari tori eg ikki at siga, men hetta elti okkum líka til Glyvursnes gjógv. Ja, hjarta var líka uppi í hálsinum á okkum báðum. Minnist ikki um vit vóru 16 ella 17 ára gamlir, tá tað hendi. Tað ringasta var, at vit høvdu ikki fleiri skot eftir.

Seinnu ferðina minnist eg eisini sera væl. Vit vóru eystan fyri Nólsoynna, høvdu fingið nakrar fuglar, tá róðursinan brotnaði og vit stýrdu við ár inn at støðni á Borðuni. Har gingu nakrir mans, og teir hjálptu okkum at binda róðrið, so at tað sat niður á tann stumpin, ið eftir var. Teir hildu, at best var at vit fóru til hús beinanvegin, og tá ið vit komu inn at støðni á Argjum, koma menn rennandi oman, tí rópt varð grindaboð úti við Borðuna. Allir bátarnir hildu út á Borðuna, men tað løgna var, at grindin gekk ímóti streyminum, og tá ið avtornaði kom grindin inn um Stongina. Grindin, ið var 70 hval, doyði í Sandagerði. Hevði róðursinan hildið, so kanska høvdu vit funnið grindina, ístaðin fyri teir, ið hjálptu okkum á Borðuni.

Eg endaði so í Grønlandi, og long tíð hevur verið millum, at eg havi verið heima, men tá eg var heima, hittust vit altíð. Var heima á vári í 2003, tá vóru 14 ár síðani seinast. Tað var til jarðarferð hjá konu beiggja mín. Eg var heima í eina góða viku, og var tað sum hjá teimum kongaligu, tí har var hvør dagur upptikin við at vitja familju og vinir. Tummas Pauli og konan komu eftir mær við bili, har fingu vit eitt prát um gamlar dagar. Vit ringdu eftir Sæmundi tað kvøldið og vit høvdu eitt hugnaligt kvøld saman. Var eisini inni á gólvinum hjá Sverra.

Eg var heima í juli 2004, tá tosaði eg eisini við Tummas Paula. At tað skuldi verða seinasta ferðin vit hittust, hevði eg ikki væntað, men vit eru ikki harrar yvir okkara lívi.

Til tykkum, ið eftir sita, sum hava mist son, beiggja, pápa og mann, eg føli við tykkum. Tárini renna meðan eg skrivi hesar reglur.

Harrin verið við tykkum øllum.

Æra verið minni um Tummas Paula Mortensen.

*Vinur tín Kári við Stein, Sisimiut, Grønland.*

## Fiskimenn:
## Kannið eftir um eftirlønargjaldið er inngoldið!

Sum kunnugt skulu reiðarar sambært sáttmálanum gjalda eina ávísa upphædd pr. dag á túrinum fyri hvørja avrokning inn á eftirlønaruppsparing hjá fiskimonnum. Henda upphædd er kr. 30 pr dag, og afturat hesum skal fiskimaður sjálvur gjalda kr. 22 pr. dag. Henda upphædd skal eftirhaldast av reiðara, sum so skal rinda samlaðu upphæddina inn.

Henda skipan er grundað á, at fiskimenn - eins og við sjálvari avrokningini - sjálvir mugu hava eftirlit við, at upphæddin eisini er goldin inn.

Peningastovnarnir senda viðkomandi eina uppgerð yvir, hvussu nógv ið er goldið inn, eins og tað altíð ber til at kanna hjá stovnunum, hvussu støðan er.

Vit fara at heita á fiskimenn um at kanna eftir, at teirra gjøld veruliga verða goldin sambært sáttmálanum og at siga okkum frá, um tað ikki verður gjørt.

Vit gera vart við hetta, tí vit eru komin fram á dømi, har ikki verður gjørt eftir skipaðu mannagongdini, og hesum eru vit bert komin eftir, tí fiskimenn hava gjørt vart við tað.

Fiskimenn hava alla grund til at vera varnir. Hetta er jú ein partur av tí, teir skulu liva av, tá tað kemur so langt.

Eina ferð enn: Kannið hetta!!!!

## Myndin á Guðrun Zoegu

Vit hava enn eina rætting til hesa mynd, sum vit hava havt í blaðnum fleiri ferðir. Nr. 5 er ikki Kristian Johansen, Gammi, men Aleksander Christiansen, á Krónni á Skála. Nr. 2 er Poul Marius Poulsen, í Horni á Skála.

Annars er tað nokkso løgið, at eingin hevur ringt um myndina sum vit høvdu í seinasta blað á síðu 2. Henda myndin var so sjáldsama góð og skillig, at tað er heilt løgið at eingin skal hava kent nakran av monnunum.

## Rætting um trolarar

Vit søgdu í seinasta blað, at "Ran" ex "Sjúrðarberg", var fyrsti hekkutrolari, sum varð bygdur til Føroyar. Hetta var eitt mistak, sum ikki skuldi komið fyri, tí sjálvsagt vóru "Stella Kristina", "Stella Karina" og "Vesturvón" fyrri.

# Grønlandstíðindi
frá Kára við Stein

**1. februar**
Stilli og 14,5 kuldastig

"Steffan C" kom inn í morgun við næstan fullari last. Teir hava verið úti í knappar tríggjar vikur. Vóru noyddir at koma inn at landa nú, tí teir skuldu skifta fólk um hálvan februar.

"Hanseraq" kom eisini inn at landa gott 90 tons, og "Lómur" landar í Aasiaat gott 90 tons. Teir kunnu ikki fara nýggjan túr fyrr enn hósdagin, tí skriviborðsskipararnir siga at teir klára ikki at taka ímóti so nógvum rækjum á virkinum har norðuri. Eisini teir smærru bátarnir landa har.

**7. februar**
Stilli og 14,8 kuldastig.

"Lómur" kom til Aasiaat at landa gott 90 tons av góðum rækjum og fóru longu nýggjan túr aftur sama kvøld. "Sermisuut", ið hevur fulla last, er í Manitsoq og landar. Teir rokna við at fara nýggjan túr í morgin. Skeljabáturin "Louvise L" liggur í Manitsoq og bíðar eftir loyvi at sigla aftur.

Søgur siga, at í teirri síðstu sending av skeljum, ið liggur í Danmark, hava teir funnið ov nógv av tungmetallum í skeljaklumpinum. Ein nýggjur mátingarháttur er komin í gildi í EU, galdandi frá 1. januar 2005, har minsta mongd, ið altíð hevur verið í skeljum, er nú hægri enn EU loyvir. Ein skeljaskipari fortaldi mær í dag, at teir hava funnið útav, at tungmetallini sita í nýrunum á skeljaklumpinum. Teir eru tískil byrjaðir at taka nýruni úr við tí úrsliti, at teir framleiða helvtina minni hvønn dag enn frammanundan, og fólkið onga samsýning fær fyri tað eyka arbeiðið. Um prísurin ikki fer upp fyri tey, ið pilka jákupskeljar, kunnu teir rokna við at missa fólkið teir hava.

"Hanseraq" kom inn í morgun við gott 50 tonsum, og fara út aftur í kvøld. "Lómur" kom brótandi ígjøgnum seinnapartin, tí ikki var roynandi fyri ísi uppi við 68 stig N og eini 54 stig V.

Nú er knútur komin í her á virkinum. Teir koyra við helvt um helvt av ísaðum rækjum og posarækjum, tí teir klára ikki at taka ímóti øllum. "Hanseraq" fór út aftur at royna, og tá teir koma inn aftur leygardagin, kann "Lómur" loysa og royna í fimm samdøgur. Ímeðan má "Hanseraq" liggja við bryggju og bíða til "Lómur" kemur inn aftur. Soleiðis koyrir virkið her í Sisimiut fyri tíðina. Um teir smærru bátarnir mugu liggja stillir í nakrar dagar, veit eg ikki at siga frá. Nú er einki annað enn at vóna at ísviðurskiftini verða betri, so "Lómur" og "Hanseraq", um ikki annað, kunnu royna í frið og náðum, uttan at verða stýrdir av landi.

**12. februar**
Eitt lot av landnyrðingi og 15,7 kuldastig.

Sum veturin hevur skikkað sær, so er heilt nógv av kava komin niður. Tað eru nógv ár síðani vit hava havt so nógvan kava, men tað hevur nógv at siga, hvussu ættin hevur verið. Summa staðni liggur nógvur kavi, men so eru nøkur støð, har so at siga alt er blást burtur.

Kuldin er ikki hildin uppat enn, og bæði februar og mars kunnu verða harðir við nógvum kulda.

Bátarnir sleppa ikki norður fyri ísi, men veðurmaðurin lovar, at blot kemur í um vikuskiftið, men seinni verður aftur kaldari um eini 20 kuldastig.

# Heimleysur í Keypmannahavn

Í flest øllum býum eru heimleys fólk. Vit kenna tað eisini her í Havn. Og av tí at Havnin er ein lítil býur, so vita vit eisini, hvørji tey heimleysu eru.

Í stórbýum uttanlands er sjálvsagt talan um nógv størri tal av heimleysum, og her síggja vit eisini fólk, sum beinleiðis sova úti á gøtuni. Tað kenna vit neyvan í Føroyum.

Beint undan valinum var eg staddur í Keypmannahavn, og vóru tey heimleysu sera sjónlig í gøtumyndini. Hetta var orsakað av, at blaðið Hus Forbi, júst var komið út. Hetta er blaðið hjá teimum heimleysu í Danmark, sum sostatt hava sítt egna málgagn.

Umrødda blað verður givið út av felagnum Hus Forbi, sum hevur heimstað í "De hjemløses hus" í Keypmannahavn. Blaðið verður gjørt í samstarvi millum heimleys, fyrrverandi heimleys, blaðfólk og myndamenn, sum ynskja at stuðla einari góðari sak. Líknandi bløð verða útgivin í øðrum londum, sum t.d. í Bretlandi, har trupulleikin av at so mong eru heimleys er enn størri enn í Danmark.

Danska blaðið er komið út síðan 1996, og endamálið er at geva teimum, sum annars ikki hava nakran góðan í fjølmiðlaheiminum, eitt málgagn. Í blaðnum her eisini til at hava kjak um umstøðurnar hjá teimum heimleysu. Blaðið kemur út 7 ferðir um árið og kostar kr. 20 fyri hvørt blað.




*Við at selja síni egnu bløð er møguleiki hjá heimleysum at forvinna sær nakað eyka.*




Tey heimleysu selja sjálvi blaðið á gøtunum. Endamálið við hesum er fyri ein part at skapa samband millum tey heimleysu og onnur fólk. Men hetta er eisini fyri at geva teimum heimleysu møguleika fyri at forvinna nakað av peningi í staðin fyri at bidda, sum tað oftast sæst í stórbýum. Seljarin fær kr. 8 av hvørjum blaði hann selur, 8 kr. fara til prenting, og 4 kr. eru MVG.

Dentur verður lagdur á, at tey, sum selja blaðið, ikki skulu taka móti peningi, uttan at eitt blað verður latið afturfyri. Hetta er fyri at styrkja sjálvsvirðingina hjá seljaranum. Hetta kann eisini vera ein stuðul at koma burtur úr verandi støðu. Í Danmark verður nevniliga gjørt fittligt av arbeiði fyri at hjálpa teimum heimleysu burtur úr teirra støðu. Og tað eru eisini dømi um, har hetta eydnast, og dømi um tey sum fáa eina nýggja byrjan og skipaða tilveru við íbúð og familjulívi.

Við at keypa eitt blað frá einum seljara ynskti eg at stuðla hesi søk. Seljarin hevði hug at práta, og hann hoyrdi væl, at eg ikki var keypmannahavnari. So hann fekk at vita, at eg var úr Føroyum.

Hann spurdi so: "Kender du min fætter?" Tá vísti tað seg, at hann hevði ætt í Føroyum, og eg kendi væl bæði systkinabørn og eisini nógvar av hansara trýmenningum. Ættin hjá honum hevur eisini verið umrødd her í blaðnum. Sum ungur hevði hann verið í Føroyum, men hann hevði einki samband havt hendan vegin í nógv ár. Nú fekk hann so at hoyra seinastu tíðindini frá sínum føroysku skyldfólkum. Hetta var eitt hugnalig prát fyri okkum báðar.

Og blaðið var heldur ikki so galið. Her var ein grein um ein ungan mann, sum í 5 ár hevði roykt hash og hevði búð úti á gøtuni. Men nú hevði hann funnið sær eina gentu, var givin at hashja og hevði vón um eina skipaða tilveru.

Ein onnur grein kallaðist "Myten om den sociale arv punkteret". Og her varð víst á, at ofta koma børn úr "belastede familier", sum tað kallast, væl fyri. Ein bók er skrivað um hetta evni. Í blaðnum vóru eisini lesarabrøv og krossorðagáta.

Um onkur hevur áhuga fyri at vita meira, ber til at fara inn á heimasíðuna: www.husforbi.dk

Her ber eisini til at tekna seg sum haldara av blaðnum. Kanska kundi hetta arbeiðið í Danmark givið íblástur til ítøkilig stig fyri tey heimleysu útyvir at útvega teimum gisting, sum eisini er alla æru vert. Men kanska kundi okkurt verið gjørt afturat, sum at útvega teimum okkurt pláss at vera ta tíðina ikki slepst inn á herbergið.

# Viðmerkingar til Fabrikkina

## Haldane Joensen hevur gjørt hesar viðmerkingar til greinina vit høvdu í seinasta blað um Fabrikkina:

Húsini hjá Hugo Øster eru umrødd. Upprunaliga vóru hesi hús, sethúsini hjá Østrøm, sum ikki Hugo, men pápin Michel Adrian Øster, sparikassastjóri hevði keypt og sum Hugo so arvaði.

Kona Adrian - mamma Hugo - Wilhelmina Elisabeth var ættað úr Gerðum í Klaksvík. Av tí, at hon var systir Absalon Joensen, sum hevur tikið tær flestu manningarmyndir, ið vit hava endurgivið frá Fornminnissavninum, finnast eisini nógvar myndir úr Rættará har Absalon ofta kom.

Kona Karl á Lað var ein onnur systir. Tí átti Jáki hjá Karl á Lað húsini har sum Lampubúðin nú er, aftaná Hugo. Hesi hús hevði Hugo eisini arvað aftaná foreldur síni og her búði hann eftir at vera fluttur úr Rættará. Teir vóru systkinabørn.

Mamma Hugo var systkinabarn við abba mín Jakki við Stein.

Abbi og omma giftust 1898 og búðu til leigu hjá Øster, í Rættará fram til 1908, tá abbi bygdi og flutti heim í Tórsgøtu (hjá Diabø), har sum nú Føroya Banki stendur.

Smogan frá Ewald Arge, i J. C. Svabos gøtu og oman í Rættará hevur fingið navnið Fosságøta, men hetta er ikki heilt beint. Fosságøta gekk fram við ánni sunnanfyri hjá Øster og Lias í Rættará niðan til Ewald Arge.

Har er avbyrgt í dag, men farvegurin sæst enn. Tí hevur onkur í síni tíð skotið upp at kalla gøtuna heimanfyri Fosságøta sum so bleiv góðtikið í gøtunavnanevndini.

Eisini verður nevndur Rundingur ella "úti á Rundingi", sum vanliga var kallað úti á Gulakletti.

Navnið "Rundingur" kom av ríðingarbreytini, sum teir hjá Østrøm gjørdu.

Ríðibreytin var sum ein rundur sirkul og sæst hann t.d. teknaður á einum havnarkorti sum varð prentað á prentsmiðjuni hjá Tingakrossi uml. 1930.

So fyrst tá Østrømmarnir fingu sær ríðingarbreyt kom navnið "Rundingur".

Elsti sonur Jakki við Stein, Hans Sundstein, f. 1899, pápabeiggi, fortelur frá tíðini í Rættará, at tað var fyrsta "træk og slip" WC, sum hann minnist í Havn. Soleiðis at skilja, at WC var bygt sum ein hill útyvir Rættará við einum slag av takrennu undir og tá ein so hevði gjørt burturav sær varð ein krani skrúvaður frá so alt rann út í ánna.

tikist við tað vælsignaða kuffert, og síðani málað mær mítt. Í kvøld havi eg arbeitt uppá bøkur. Alt væl.

**Fríggjadagur, 14. februar 1930**
Í dag er meira ilsligt at kalla. Hann er í dag høgur við regni fyrrapartin. Í kvøld er tað kaldari, tað eru hvøss heglingsæl og vindur eisini. Tað frystur í kvøld. Eg havi bundið inn í dag. Alt væl.

**Leygardagur, 15. februar 1930**
Gott veður við kava, ættin er útnyrðingur vestan. Eg havi fingist við bøkur. Í kvøld er av fínasta veðri. Alt væl.

**Sunnudagur, 16. februar 1930**
Verið í kirkju og á møti. Veðrið er fínt. Eg havi í dag spákað fyri og eftir møti við Onnu og Elsu. Í kvøld hevði eg ein fínan tjans, men eg brúkti hann ikki, sum eg skuldi. Eg var og gekk við henni ein langan túr, men segði einki um tað, sum lá mær fremst á tunguni. Nær man eg fáa so góðan tjans aftur? Eg eri so upprørdur í kvøld, at eg sovni nokk ikki brádliga. Hannus og John vóru í Sørvági. Stilli fyrrapartin, men nú eitt fleyr av útsynningi.

**Mánadagur, 17. februar 1930**
Toluligt veður fyrrapartin, tað hevur tó ælað av og á. Nú í kvøld er verri veður. Nú er samregn og stormur av útsynningi. Eg havi bundið inn. Alt væl.

**Týsdagur, 18. februar 1930**
Í dag hevur verið ilsligt veður. Dimligt og regn av og á fyrrapartin. Nú er stormur av suðri. Vit hava koyrt torv, og síðani havi eg tikist við annað smávegis. Alt væl.

**Mikudagur, 19. februar 1930**
Óveður í dag. Stormur av suðri og ógvuliga myrkt í veðrinum. Eg havi í dag bundið inn. Alt væl.

**Hósdagur, 20. februar 1930**
Toluligt veður, ælingur av útsynningi. Stakksáfossur var her í dag. Eg havi bundið inn. Alt væl.

**Fríggjadagur, 21. februar 1930**
Eg havi gjørt plikt í dag. Tað er ikki smávegis, eg havi 40 tímar at gera, og ikki var eg meira enn 8. Einkul æl vóru so av og á. Hann er lágur í ættini. Alt væl.



*Kirkjan spældi stóran leiklut í lívinum hjá Bernhard.*



*Tað sama gjørdi Meinigheitshúsið, sum er næstuttasta hús t.v. Brúðarparið Eivild og Mathias Thomassen. Henda mynd er eisini frá 50-unum.*

**Leygardagur, 22. februar 1930**
Veðrið hevur í dag verið fínt. Eg havi aftur gjørt plikt, eg fekk í dag 10 tímar. Eg slapp við pliktini í dag. Martin gjørdi við mær og hinar tímarnar fekk eg. Ættin er útsynningur og ælar við hvørt. Alt væl.

**Sunnudagur, 23. februar 1930**
Veðrið er gott í dag. Eg var í kirkjuni og til møti. Eg var eisini inni í Miðvági og hugdi at fótboltskampi millum miðvingar og sørvingar. Í kvøld havi eg so spákað við Onnu og Elsu. Alt væl.

**Mánadagur, 24. februar 1930**
Gott veður. Gjørt kuffertið liðugt og annað sovorðið smávegis. Tað var Fiskimannafelagsfundur í kvøld. Fundurin var um kontraktina. Vit samtyktu í eini streyku. Hann ælar í kvøld av suðri. Alt væl.

**Týsdagur, 25. februar 1930**
Gott veður, ættin er landsynningur sunnan. Eg havi lagað garðar í dag, og síðani fingist eitt sindur við bøkur í kvøld. Lotið er kalt í kvøld. Alt væl.

**SKIPSBOÐ**

**Mikudagur, 26. februar 1930**
Verið inni í Miðvági hjá doktaranum fyri oyra. Eg fekk til ráð at koyra Glyserin í oyrini og nap(ull) fyri, tað er óhugnaligt at hava. Eg eri nú so stak deyvur. Vit fingu boð at koma í gjár, so nú er tað liðugt fyri hesaferð. Eg skal fara fríggjadagin. Veðrið er gott. Fyrrapartin var ættin landsynningur, nú er útsynningur sunnan. Eg havi bundið inn, sluttað. Alt væl.

**Hósdagur, 27. februar 1930**
Lagað garðar fyrrapartin, síðani havi eg gjørt ymiskt, riggað mær alt av og goymt tað burtur. Veðrið var toluligt, men nú er regn. Ættin er útsynningur sunnan. Alt væl.

**Fríggjadagur, 28. februar 1930**
Eg havi nú verið hjá doktaranum aftur. Nú hoyri eg sum fyrsta dagin. Tað er ein lætti omaná hesar báðar dagarnar. Eg havi í dag pakkað niður. Eg skal avstað í morgin við "Smyrli". Eg havi sitið uppi til kl. 4½ í nátt. Anna og Elsa sótu eisini. Ikki eydnaðist tað, sum eg bíndi uppá. Nú fari eg í morgin, Jesus verið við mær. Nú fara allir. Janus og systur komu í dag við "Smyrli".

**Leygardagur, 1. mars 1930**
Í morgun tá "Smyril" pípaði mundi tað heila ligið eftir. Tað var so gott sum eingin uppi tá hann kom. Hann hevði longu pípað triðju ferð, tá vit komu inn á Leitið. Gamli var gruggutur, tí hann mátti støðga so leingi. Tað var rusk á sjónum, tung alda, men blíkaði, tá vit komu í Hestfjørð. "Suðuroy" er ikki komin á Havnina. Vit logeraðu á Sjómansheiminum. Eg fór í song kl. 10 í kvøld.

**Sunnudagur, 2. mars 1930**
Var í kirkjuni. "Suðuroy" er komin. Vit fóru umborð, tá vit komu aftur úr kirkjuni. Har sá heldur ónosligt út, og døgurða fingu vit ongan. Teir høvdu óútvatnaðan klippfisk og sjósaltaða suppu til døgurða. Eg reiddi mær so upp og gekk eitt sindur í landi, men tørnaði so tíðliga inn.

**FRÍGGJARABRÆVIÐ**

**Mánadagur, 3. mars 1930**
Vit fóru at stabbanum í morgun tíðliga. Síðani hava vit tikið salt og vatn. Í kvøld havi eg so gjørt nakað sum víst hevur stóran týdning fyri lívið í heila tikið. Eg havi skrivað bræv til hana, Onnu, gentuna sum eg nú í longri tíð havi elskað. Tað eydnaðist mær ikki at fáa tað sagt, meðan eg var heima. Nú er tað sagt, so nú fer Gud og eydnan at ráða. Tað verður strævið hjá mær at liva í ótta og iva allan hendan túrin, men tað fer so at verða sum tað vil. Svar fái eg einki fyrr enn eg komi aftur. Ja, eg elski hana av mínum heila hjartað, og havi gjørt tað, eg haldi alt mítt lív. Nú er brævið farið í postkassan, og í morgin lesur hon tað.

**Týsdagur, 4. mars 1930**
Liggja enn við stabban. Vit hava í dag tikið proviantin umborð, og eitt sindur av salti afturat. Hetta er strævnasti dagurin hjá mær á túrinum. Eg sveitti sum ein hundur av at baksa við 200 punds sekkirnar og stúgva teir av og so allan hin proviantin. Her er tó so dámligt, eftirsum tað plagar at vera, men strævið er tað tó kortini. Veðrið er gott. Nú hevur hon lisið brævið. Eg eri so spentur og ótolin at fáa at vita, hvat hon sigur. Eg gangi og hugsi um, at hon kanska fer at stappa mær eitt bræv niður í klæðnaposan, men tað er býttligt. Eg má bíða til í summar.

**Mikudagur, 5. mars 1930**
Fólkið kom í dag vestanífrá og eisini norðaneftir. Vit hava í dag tikið kol, og síðani havi eg tikist við eitt og annað. Í dag hava vit so mynstrað. Tað vóru allir inni hjá Fysikus at taka sýnsprøva, men eg slapp ikki upp í part har. Nógvir dumpaðu. Eini 5 vóru sum ikki fingu sýnsprøva. Á fútakontórinum var ein gangur av Sigfred og øllum hesum smáu hann bjóðaði teimum sigar og flenti at teimum. Eg havi ikki verið við til sovorðna mynstringar fyrr. Alt væl.

**Hósdagur, 6. mars 1930**
Teir hava í dag verið á Sælartúr eftir ísi og sild. Nú eru vit klárir at sigla, og nú er alt komið umborð, bæði fólk og alt, sum vit skulu hava. Vit fara ikki út í kvøld, men í morgin um Gud vil. Vit liggja enn við stabban, og fara ikki frá fyrr enn vit fara út. Veðrið er gott. Eg havi verið í landi og spákað í kvøld. Alt væl.

*Framhald á næstu síðu*

**Fríggjadagur,**
**7. mars 1930**
Ikki bleiv útfarið í dag. Vit hava nú tikið tað, sum vantaði umborð og Jacob Pauli og Ábraham og ein kollfirðingur komu ikki fyrrenn í dag. Tað var av misgávum, at eg skrivaði soleiðis til í gjár. Nú eru vit klárir at fara. Eg hugdi tó gjølla eftir í klæðunum, um ikki okkurt skuldi vera til mín, men tað var einki uttan nøkur orð frá Elsu, og so ein heilsa frá Onnu. Eg bleiv skuffaður, men tað nýttist eg ikki at verið, tí eg vildi einki svar hava fyrr enn eg kom aftur. Alt væl.

**Leygardagur,**
**8. mars 1930**
Nú eru vit útfarnir. Í dag kl. 1 eftir middag fóru vit út. Enn eru vit ikki komnir langt, vit liggja útfyri Rituvík. Tá vit vóru komnir eystur um Nólsoy, tá høvdu teir gloymt loddini eftir, so mátti báturin aftur í land eftir teimum. Ebbi kom umborð aftur við teimum og bemandingslistanum. Hann hevði skiparin eisini lagt eftir á Sjómansheiminum. Veðrið er gott, eitt lítið fleyr. Alt væl.

**Sunnudagur,**
**9. mars 1930**
Tað er í dag nakað av vindi og kavarokið. Vit liggja og kroka eystanfyri Fugloy. Her er slætt og gott veður. Vit høvdu lestur um middagin og andakt í kvøld. Alt væl.

**Mánadagur,**
**10. mars 1930**
Liggja á Norðurhavinum. Ættin er útnyrðingur, tað er nógvur vindur. Vit hava fingið okkum at kóka. Vit halda ikki á enn, tí hann er so tvørligur í vindinum. Alt væl.

**Týsdagur,**
**11. mars 1930**
Tað er enn ódnarveður av útnyrðingi norði. Vit liggja bakk. Tað er heldur ófýsið at byrja við, og fólkið er einki serligt tilpassar. Tað gongur tó so frætt tað kann. Alt væl.

**Mikudagur,**
**12. mars 1930**
Grækarismessudagur! Vit eru nú byrjaðir at sigla, vit byrjaðu í kvøld. Hon gongur nokk so skjótt o.u. 5 míl. Ættin er nú landnyrðingur norðan. Teir smáu eru summir nakað ringir av sjóverki, annars er alt væl.

**Hósdagur,**
**13. mars 1930**
Tað er í dag nokkso nógvur vindur av landnyrðingi. Hon gongur sum á gróti, o.u. 8 míl. Hann hevur kava av og á í dag. Alt væl.



*Familjumynd hjá Bernhardi. Frá vinstru: Jóhannus, Elsa, Birita, mamman, Bernhard, Maria. Aftast er elsti beiggin Jákup Pauli. Pápin Johan Hendrik á Mýrini er longu deyður, tá myndin er tikin.*

**Fríggjadagur,**
**14. mars 1930**
Í dag er stormur av landnyrðingi. Vit sigldu fyrrapartin, hon gekk sum á gróti, inntil vit sóu land, so bleiv tillagt. Í kvøld hava vit so ligið bakk. Tað er í dag ógvuliga kalt. Alt væl.



*Ebbe Muller var sonur reiðaran Ebbu Müller.*

**Leygardagur,**
**15. mars 1930**
Vit liggja nú útfyri (?), tað er sami stormurin og ættin er tann sama. Tað er bítandi kalt. Í kvøld stilti av. Vit sóu fyrsta fiskin í kvøld, hann fór livandi á pannuna. Alt væl.

**Sunnudagur,**
**16. mars 1930**
Fínt veður. Liggja í sama stað. Høvdu lestur um middagin og andakt í kvøld. Alt væl.

**Mánadagur,**
**17. mars 1930**
Eru nú komnir eystur til oyggjarnar. Vit sigldu higar í nátt. Vit hava í dag fingið o.u. 400 fiskar. Ættin er landnyrðingur. Alt væl.

**Týsdagur,**
**18. mars 1930**
Nógvur vindur av landnyrðingi. Lógu bakk allan fyrrapartin. Vit háláðu av kl. 6 í kvøld, og fingu o.u. 400 fiskar. Nú í kvøld er gott veður, men kalt. Alt væl.

**Mikudagur,**
**19. mars 1930**
Vit eru nú á veg vestur eftir. Vit hava í dag roynt inni undir Oyrabakka. Har fekst lítið o.u. 50 fiskar var øll veiðan. Tað er ógvuliga kalt. Alt væl.

**Hósdagur,**
**20. mars 1930**
Kavarok av landsynningi fyrrapartin. Gekk so upp til landnyrðing seinnapartin. Liggja vestureftir ímóti Selvogsbankanum. Hava ikki hálað av, alt er so avísað. Kuldin er herviligur. Alt væl.

**Fríggjadagur,**
**21. mars 1930**
Í morgun var hon undarlig at síggja. Hvør dropi, sum kom á hana í gjár frysti. Alt var hvítt, líka frá knappunum og niður á sjógv. Allir endar vóru sum ein ormur so tjúkkur á dekkinum, at fokkan fekk ikki farið eftir toybumminum. Í morgun fóru teir so at bróta leyst. Teir skoldaðu og bankaðu og bardu. Ikki fingu teir hálað av fyrr enn eftir middag. Vit fingu o.u. 300 fiskar. Teir smáu eru kaldir, ein stendur niðri í gongini í kahyttuni og koyrir, ein heldur hendurnar niður í roykhattin, so vit eru við at kødna niðri undir.

**Leygardagur,**
**22. mars 1930**
Liggja inni við land. Vindurin er nógvur, men tað líður eitt sindur. Hann er eystaneftir í ættini. Vit hava ligið bakk í dag, og tað hava skipini gjørt yvirhøvur. Vit hava sæð fleiri skip í dag. Alt væl.





*Ebba Müller var reiðari. Hon var upprunaliga donsk og giftist við reiðaran Hans Müller. Tá tók hon yvir og var eisini eitt skifti formaður í reiðarafelagnum.*

**Sunnudagur,**
**23. mars 1930**
Í dag hevur veðrið verið gott. Ættin er landnyrðingur, so tað er slætt. Vit høvdu sum vanligt lestur um middagin. Í kvøld hava vit verið umborð á "Silver Belle" til møti. Tað var ógvuliga hugnaligt. Vit høvdu møti í lugarinum, síðani blivu vit trakteraðir, so væl sum teir kundu. Magnus, skiparin, vísti okkum so skipið serliga motorin, sum teir vóru ógvuliga forliptir uppi í. Tað er ikki meira enn hendilsi at koma soleiðis fyri, at tvey skip kunnu hava møti saman á Suðurlandinum. Alt væl.

**Mánadagur,**
**24. mars 1930**
Veðrið var gott fyrrapartin. Kl. 4 seinnapartin bleiv hálað inn. Vit hava í dag o.u. 800 fiskar. Nú er stormur av landsynningi og kavarok. Ættin er landsynningur. Alt væl.

**Týsdagur,**
**25. mars 1930**
Í dag hava vit o.u. 1400 fiskar. Tað er gott veður. Ættin er útnyrðingur. Tað síggjast nógv skip afturút. Alt væl.

**Mikudagur,**
**26. mars 1930**
Óveður. Liggja bakk. Hava ligið bakk í allan dag. Tað er ónossligt. Vátakavi av landnyrðingi. Alt væl.

**Hósdagur,**
**27. mars 1930**
Sama óveður og ættin tann sama. Hava aftur í dag ligið bakk allan dagin. Alt væl.

**Fríggjadagur,**
**28. mars 1930**
Nú er hann eystan í ættini. Lógu bakk til kl. 3 seinnapartin, so bleiv avhálað og vit fingu o.u. 1000 fiskar. Alt væl.

**Leygardagur,**
**29. mars 1930**
Aftur óveður. Hava ligið bakk í allan dag. Tað hevur verið kavarok og stormur. "Albert", "Victor" og "Vágoy" hava praiað okkum. Alt væl.

**Sunnudagur,**
**30. mars 1930**
Fínt veður í dag. Ættin tann sama. Høvdu lestur sum vanligt og andakt í kvøld. "Havfari" og fleiri hava preiað okkum í dag. Tað er stilli nú. Alt væl.

**Mánadagur,**
**31. mars 1930**
Toluligt veður. Ættin er landnyrðingur ella eystan. Nakað av vindi seinnapartin. Nógv skip at síggja í dag, millum annað "Docea". Tað er ikki so kalt nú. Vit hava o.u. 1000 fiskar. Alt væl.




*Tá Bernhard kom til Havnar helt hann til á sjómansheiminum. Hetta er ein gomul mynd úr Vágsbotni og uttast t.h. sæst skjøldurin á sjómansheiminum.*

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

# Kunningarfundur hjá nýggja fiskamarknaðinum



*Jens Christian Olsen greiðir frá.*

Sum vit greiddu frá í seinasta blaði er nýskipaði fiskamarknaðurin farin undir at hava fundir kring landið, har fiskimenn, útróðrarmenn, fiskakeyparar og onnur áhugað eru vælkomin.

Fyrsti fundur varð seinasta hósdag á Toftum, har tað vóru einir 50 luttakarar tilsamans. Stjórin Jens Chr Olsen greiddi frá søguni hjá fiskamarknaðinum og um ætlanirnar, sum eru fyri framman. Aftaná var orðaskifti, har nógvir tóku lut. Her vóru eisini uppskot um, hvussu tænastan kann gerast betri. Týskvøldið var fundur á Hotel Vágum. Tann 24. feb. 2005 kl 19:00 verður fundur á Hotel Øravík. Annars verða fundir 8. mars í Sandoy og 11. mars í Klaksvík. Tað verður seinni kunngjørt hvar hesir fundur verða.

Ætlanin er annars, at kunningartilfar frá Fiskamarknaðinum skal koma í FF-blaðið.

Vit vóru á fundinum og hava nakrar myndir.



*Kai Jacobsen er teldumaður hjá fiskamarknaðinum.*



*Hans David Gregersen t.h. er ein royndur fiskimaður. M.a. hevur hann verið nógv ár við Stapanum. T.v. Emil Vang.*



*Nevndarformaðurin Alfred Petersen tv. í samrøðu við útróðrarmannin Jákup Joensen úr Leirvík.*



*Feðgarnir Heri t.h. og Tórhallur Thomsen. Hetta er menninir aftanfyri HT transport og eftir ætlan einasta farmaskipareiðarí, sum burturav føroyingar eiga.*

**Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá**

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

***Sp/f Contrive Jsp Ltd.***
**FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945**

## Fiskimenn og ALS

# Hetta varð sagt um ALS í okkara ársfrágreiðing fyri 2004

Tað var á vári 2003 at settur varð ein arbeiðsbólkur, sum skuldi endurskoða ALS-lógina, ikki minst við atliti at tí spurningi, sum tá var frammi, nevniliga, at ALS veruliga var ein almennur stovnur, ið skuldi á fíggjarlógina.

Vit mettu tá og meta enn, at hetta var ein óundirbygd roynd hjá almennum myndugleikum at leggja ALS og aðrar grunnar undir seg við grundgevingum, sum als ikki vóru veruligar.

Umframt hetta skuldi lógin sum heild endurskoðast.

Formaðurin í FF gjørdist umboð fyri manningarfeløgini í hesum bólki. Og setningurin hevur verið, at fiskimenn fáa ein rímiligan rætt í ALS, tá teir eru arbeiðsleysir. Serliga er hetta aktuelt, tá teirra skip liggur í longri tíð enn vanligt, sum t.d. tá tey eru til umvælingar o.t.

Hóast stýrið fyri ALS hevur heimild til at gera eina slíka skipan, hevur tað ásett og hildið fast um, at fyri at koma inn í skipanina, skal fiskimaður vera endaliga uppsagdur og skal vera farin av skipinum með alla.

Hetta eru somu reglur, sum eru galdandi fyri t.d. starvsmenn, men her hava vit gjørt vart við, at setanarumstøður hjá føroyskum løntakarum eru sera ymiskar. Summir eru fastløntir. Teir hava fast arbeiði frá mánadag til fríggjadag og hava fasta løn. Alternativið er, at hesir ikki hava arbeiði og tí einki tilknýti hava til nakran arbeiðsgevara. Verandi reglur í lógini eru grundaðar á hesa støðu.

Mótsatt er tað hjá fiskimonnum. Hóast ikki uppsagdir, so er teirra starvsviðurskifti óviss. Teir eru tryggjaðir løn fyri teir dagar, teir eru í vinnu. Men teirra skip kann liggja í longri ella styttri tíð, og hava teir tá ikki nakað arbeiði ella inntøku. Mest vanliga orsøkin fyri hesum eru umvælingar, sum ofta taka longri tíð enn vanligt. Ein onnur orsøk kann vera tvørrandi lønandi veiðimøguleikar. Tá eru fiskimenn í somu støðu sum onnur arbeiðsleys.

Men vit meta tað sum eina styrki fyri arbeiðsmarknaðin, at fiskimenn í slíkum støðum framvegis meta seg sum ein part av manningini, og at teir eru stand by, tá skipið er klárt at fara avstað aftur. Tað má vera munur á, at kunna starta aftur við eini royndari manning heldur enn at skula upplæra eina nýggja manning.

Kravið frá ALS er, at skulu hesir menn koma inn í skipanina, eiga teir at verða sagdir upp ella sjálvir siga upp. Hetta merkir sjálvsagt, at teir tá eru uttan arbeiði, og skipið er uttan manning. Tá so skipið er klárt, skal skipið mannast av nýggjum - prinsipielt við nýggjum fólki, meðan manningin, um henni ikki er ávíst annað arbeiði, framvegis er arbeiðsleys.

Hetta meta vit vera ein skipan, sum hvørki kann vera áhugaverd hjá ALS, reiðaranum ella hjá tí arbeiðsleysa fiskimanninum. Vit síggja als onga meining í, at ALS sum útgangsstøði skal noyða menn til at bróta eitt arbeiðtakara/-arbeiðsgevarasamband, tá hetta ikki er neyðugt. Tað má vera ein styrki fyri einhvønn arbeiðsmarknað, at hesi eru intakt.

### Formalisma ella greiðar reglur

Tað er einki sum forðar fyri skipaðari uppsøgn uppá kvamsvís fyri at koma inn í skipanina. Tað er júst hetta, sum verandi støða hjá fiskimonnum í ALS leggur upp til. Eingin kann forða fyri ella hava eftirlit við, at reiðarin gevur fiskimanninum eina formella korrekta uppsøgn og avtalar munnliga við hann, at hann skal sleppa við aftur ella at fiskimaðurin ger tað sama. Tað er óneyðugt at siga, at júst henda støða undirgrevur skipanina, álitið á hana og moralin hjá pørtunum.

Hetta er orsøkin til, at vit hava viljað havt skipaði viðurskifti á hesum øki, soleiðis at tá menn eru reelt arbeiðsleysir, eiga teir at koma inn í skipanina eftir heilt greiðum reglum.

Hetta vil fremja álitið hjá fiskimonnum til skipanina, umframt at menn fara at ganga eftir greiðum reglum, heldur enn at teir við formalismu sleppa sær inn í skipanina. Og hetta kann gerast væl dýrari fyri ALS enn við greiðum reglum.

Arbeiðið í umrødda bólki hevur gingið sera seint. Ein orsøk er tann, at løgtingsvalið í 2004 steðgaði arbeiðinum rættiliga leingi. Ein onnur er, at tað hevur verið bíðað eftir einum serfrøðingabólki, sum løgfrøðiliga hevur kannað umrødda málið um ALS mótvegis fíggjarlógini. Men nú er setningurin, at arbeiðið skal verða liðugt seinast í januar, so tað kann avgreiðast í hesi tingsetuni.

Tað er óneyðugt at siga, at vit vilja leggja sera stóran dent á, at loysnin fyri fiskimenninar verður virðilig, tá álitið hjá nevndini verður lagt fram.

## Uppskotnar broytingar í ALS lógini

1. Heimild verður fingin til vega, soleiðis at avvarðandi landsstýrismaður og Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina kunnu gera avtalur um, at Arbeiðsloysisskipanin tekur á seg aðrar uppgávur, sum hava samband við arbeiðsmarknaðin.
2. Heimild verður fingin at renturokna skyldugt ALS-gjald til Arbeiðsloysisskipanina, umframt at krevja avgreiðslugjøld.
3. Arbeiðsloysisskipanin fyri sjálvstøðugt vinnurekandi verður broytt frá at vera ein skipan, har inn- og útgjald eru tengd at inntøkuni hjá viðkomandi, til at vera ein skipan við føstum inn- og útgjøldum.
4. Broytingar verða gjørdar, soleiðis at mótrokning í hægst loyvda arbeiðsloysisstuðli bert verður framd fyri eftirlønir og ikki sum í dag somuleiðis vegna ymsar almannaveitingar.
5. Farloyvisskipanin verður meira liðilig, við tað at Stýrinum fyri Arbeiðsloysisskipanini í størri mun verður heimilað at broyta útgjaldið í mun til vanligt útgjald fyri arbeiðsleys.
6. Heimildirnar til Stýrið í sambandi við førleikagevandi tiltøk fyri arbeiðsleys verða víðkaðar, m.a. soleiðis at skipanir viðvíkjandi arbeiðsvenjingum, har Arbeiðsloysisskipanin endurrindar arbeiðsgevaranum, kunnu setast í verk.
7. Bíðidagarnir verða styttir frá at vera í mesta lagi 10 dagar til 5 dagar.
8. Í fiskavirkisskipanini eru reglurnar viðvíkjandi útrokningargrundarlagnum broyttar soleiðis, at útrokningargrundarlagið verður endurskoðað árliga. Útgjaldið hækkar um endurskoðaða grundarlagið er hægri enn gamla grundarlagið.
9. Harumframt eru eisini aðrar broytingar skotnar upp, sum tó fyri tað mesta vera mettar ynskiligar fyri at seta til viks møguligan iva í sambandi við tulkingar av lógini.

Hetta er uppskotnu broytingarnar aftaná 25 fundir í tvey ár. Víst verður til viðmerkingar í øðrum greinum um hetta evni.

FFbladið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Ring um lýsingar á tlf. 31 15 69
ella send eitt fax á 31 87 69
gevur MEIRI fyri MINNI

MAN B&W Diesel A/S
Umboðið · Ernst Reinert
Alpaha Diesel motorar og eykalutir
Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64

# Minstalønin eigur at hækka

*Føroya Fiskimannafelag hevur sent Bjørn Kalsø soljóðandi bræv:*

Nú freistin fyri at leggja uppskot fram á ting í hesi tingsetuni er um at vera úti, fara vit at minna um hjálagda bræv, sum varð sent tykkum tann 25. august 2004. Hetta snýr seg um tann upplagda órætt, har fiskimenn, sum gjalda fullan skatt í Føroyum, verða avskornir frá inntøkutrygd, tí teir formelt hava bústað í t.d. Danmark.

Vit fara eisini at reisa ein annan spurning, og tað er við sjálvari minstulønini. Minstalønin samsvaraði í nógv ár við eina vanliga mánaðarløn hjá arbeiðara á landi, sum í dag svarar til 21 arbeiðsdagar um mánaðin.

Men so kom dagstudningurin í 80-unum, sum av sær sjálvum reguleraði inntøkutrygdina í mun til arbeiðaralønirnar.

Hetta hendi á tann hátt, at tá lønirnar fóru upp, fór dagstudningurin upp við tí sama, hóast minstalønin stóð í stað.

Hetta merkti, at minstalønin dragnaði í mun til lønarlagið. Tað kom tó "bert" at ávirka sjúkraviðbótina hjá fiskimonnum.

Vit halda tað vera rættast, at minstalønin og harvið sjúkraviðbótin fylgja lønarlagnum, sum tað upprunaliga varð gjørt.

Tað var vist í 2004, at løgtingið samtykti eitt modell fyri gongdina í minstulønini, sum var:

tímaløn x 8 arbeiðstímar pr. dag x 30 dagar x 60%. Hetta gevur í dag 14.515.

Rætta mánaðarlønin kemur soleiðis fram: tímaløn x 8 t. x 21 arbeiðsdagar í einum mánaði. Hetta gevur kr. 16.934, sum í dag kann sigast at vera mánaðarløn hjá arbeiðara við fullum tímatali.

Sum tit síggja, so eru tær kr. 14.515 eitt heilt tilvildarligt tal, sum ikki er grundað á nakað sum helst.

Tað skal skoytast uppí, at okkara uppskot vil helst vera útreiðsluneutralt. Hetta vil hækka sjúkraviðbótina nakað. Men tá minstalønin fer upp, fer dagstudningurin niður. Og tað er bíligari fyri landskassan at hava ein lægri enn hægri dagstudning.

Vit vóna, at hetta mál kann verða viðgjørt við vælvild.

## Karin Kjølbro:

# Blokeraði sum formaður fyri, at fiskimenn skuldi fáa inn í eygað

**Samstundis sum formaðurin fyri nevndina, sum endurskoðar ALS, frá byrjan av hevur nýtt alla sína orku at forða fyri, at fiskimenn skuldu fáa nakrar sum helst sømdir, so stuðlaði hon uttan himpr uppskoti at geva betri sømdir til sum tey veruliga eru hálønt. Spurningurin er, um hon ikki hevur misbrúkt sítt formansstarv til fyrimuns fyri persónlig sjónarmið.**

Tað eru tvey ár eru liðin síðani Bjarni Djurholm, landsstýrismaður setti eina nevnd at endurskoða ALS lógina. Nevndin skuldi eisini viðgera spurningin um sambandið millum ALS og fíggjarlógina, sum varð umrøtt í seinasta blaði.

Í nevndini hava verið 8 limir. Tríggir frá hvørji síðu av arbeiðsmarknaðinum, eitt umboð fyri Vinnumálaráðið og ein formaður. Hesin hevur verið Karin Kjølbro, sum eisini er fráfarandi formaður í ALS.

Arbeiðið hevur verið sera drúgt. Einir 25 fundir hava verið hildnir og nú er endaliga úrslitið handað landsstýrismanninum, sum setti nevndina.

Fyrst skal sigast, at her er ikki talan um nakra kollvelting av nøkrum slagi. Tær allarflestu broytingarnar eru bert av umsitingarligum slagi, so tað kann staðfestast, at úrslitið kann neyvan sigast at standa mát við alt tað arbeiði, sum er lagt í hetta álit.

Manningarfeløgini á sjónum áttu ein lim í nevndini, og hesin var Óli Jacobsen.

Hansara luttøka í nevndini hevur - umframt vanliga endurskoðan - eisini verið við tí málsetningi at fáa eina skipan, sum kundi tryggja fiskimenn, tá teirra skip verða løgd av eini ella aðrari orsøk, og menn onga inntøku hava.

Stóru trupulleikarnir í hesum hava verið, tá skip hava ligið vegna umvælingar og serstakliga, tá hesar hava tikið longri tíð enn ætlað. Tá hava fiskimenn ikki havt nakran rætt til stuðul, og hevur verið sera stór ónøgd um hetta. Tí hevur Óli lagt stóra orku í at royna at fáa eina skipan, sum kann taka við í slíkum førum.

Tað hevur verið sera trupult at fáa "gehør" fyri okkara sjónarmiðum í bólkinum, og serstakliga hjá formanninum í nevndini. Grundleggjandi hugburðurin hevur verið, at fiskimenn í hesi støðu eru ikki at rokna sum arbeiðsleysir á sama hátt sum onnur arbeiðsleys, sum eru fevnd av ALS. Munurin sambært hesi fatan er tann, at fiskimenn í hesi støðu kortini hava eitt arbeiði, sum bíðar eftir teimum.

Sum undanførsla hevur eisini verið nýtt, at skal hædd takast fyri fiskimonnum í hesi støðu, so er nógvir aðrir bólkar, sum kundu havt sama rætt, sum t.d. handverkarar í eini óstøðugari vinnu.

Hetta eru eisini viðurskifti, sum tað hevði kunnað verið tikin hædd fyri, tá eitt skipan varð tilevnað.

Men hesum hevur púra eingin áhugi verið fyri. Besta prógv fyri hesum er, at formaðurin hevur nýtt skattaskipanin hjá fiskimonnum, sum einki hevur við hetta mál at gera, sum grundgeving móti at ganga fiskimonnum minsta sindur á møti.

Óli Jacobsen hevur í nevndararbeiðinum lagt fram fleiri skjøl við grundgevingum í hesum máli, har hædd verður tikin fyri umrøddu fyrivarnum, og har uppskot hevur verið um, hvussu umrøddu vansar kunnu loysast. Hesar eru í høvuðsheitum endurgivnar í blaðnum við tí broti um ALS, sum er víst í ársfrágreiðingini hjá Føroya Fiskimannafelag fyri 2004. Men hetta hevur ikki á nakran hátt rinið við.

Samstundis er trupulleikin tann, at tað verður nógv truplari at fáa eina skipan framda, sum ikki fær undirtøku frá pørtunum í ALS, enn eina sum hevur slíka undirtøku. Sum kunnugt eru partarnir í stýrinum - eins og í arbeiðsbólkinum - umboðaðir við trimum umboðum frá hvørjum av pørtunum, nevniliga arbeiðsgevarum og løntakarum.

Tað eru átta limir í bólkinum ella ein meira enn í stýrinum fyri ALS. Hetta er orsakað av, at umframt samansetingina í stýrinum fyri ALS er eitt umboð fyri Vinnumálaráðið. Men tað hevur eydnast at fáa undirtøku frá fýra limum, sum umboða privata arbeiðsmarknaðin, fyri eini avmarkaðari skipan fyri fiskimenn, sum er grundað á fylgjandi prinsipp:

1. Um skip liggur í 30 dagar, koma fiskimenn inn í skipanini fyri ta tíð, sum er útyvir 30 dagar, tá skip liggur vegna umvælingar. Undantikið er lega vegna manglandi kvotu ella fiskidagar. Menn kunnu vera inni í skipanini í 3 mánaðir.

2. Er inntøkan undanfarnu 12 mánaðir upp til 1,5 arbeiðaraársløn, uml. kr. 305.000, verður goldið fult gjald upp til 3 mánaðir. Men fyri hvørjar kr. 1.000, sum inntøkan fer upp, minkar gjaldið við 0,5%, og merkir hetta, at við inntøku uppá kr. 505.000 verður einki goldið.

3. Fiskimenn skulu vera tøkir eins og onnur arbeiðsleys.

Hetta kann virkað lítilsvert - serliga við avmarkingini í pkt 2. Men støðan er tí tann, at hetta er tað mesta, sum nóg stór undirtøka kundi fáast fyri í hesum bólkinum. Hvussu trupult tað hevur verið at arbeitt við hesum máli sæst av, at tað nú kann staðfestast, at formaðurin í bólkinum frá fyrsta degi hevur sett sær fyri, at einki skuldi gerast á fiskimannaøkinum, soleiðis sum tað er greitt frá í aðrari grein. Hetta hevur gjørt arbeiðið í bólkinum sera trupult.

Fýra er bert helvtin av átta og er tí ikki meiriluti. Men hesir eru tó ein meiriluti av arbeiðsmarknaðarumboðunum í bólkinum, og hetta kann so vera ein grundgeving, ið telur mótvegis løggávuvaldinum. Og sigast kann eisini, at hetta uppskot er í hvussu er av 2/3 av arbeiðsmarknaðarumboðunum, og er tískil ein viðurkenning av, at fiskimenn eru í eini serstøðu.

Tað skal sigast, at hevði formaðurin tikið hesa støðu hjá vinnuumboðunum til eftirtektar og hevði stuðla tí, hevði hetta verið við í sjálvum almenna tilmælinum hjá nevndini. Men hann valdi at blokera fyri, at hetta hendi við at atkvøða ímóti. Vit meta heilt greitt, at formaðurin hevur latið síni persónligu áhugamál ganga framum formansuppgávuna, sum væl má vera at royna at fáa semjur ella neyðsemjur millum partarnar í eini nevnd.

Vit hava givið landsstýrismanninum á økinum eina neyvari frágreiðing um, hvussu vit hava upplivað leiklutin hjá formanninum.

**Valið fyri fiskimenn**

Fyri fiskimenn hava tískil verið tveir møguleikar. Annar kundi verið at fiskimenn als ikki høvdu verið nevndir í álitinum. Hetta hevði verið ein totalur sigur fyri formannin, sum harvið hevði nátt sínum máli á hesum økinum. Men tá hevði tað verið sera trupult at koma aftur um aftur, tá ein slík lóg ikki verður broytt grundleggjandi á hvørjum degi ella ári.

Hin møguleikin er at fáa so frægt við í álitið, sum tað letur seg gera. Og so at vóna, at politiska viðgerðin verður meira seriøs enn tann, sum formaðurin hevur staðið fyri. Hetta hava vit valt at gera. Hervið er tað nú eisini greitt, hvørjum kreftum fiskimenn eru uppi ímóti og hvørja mannagongd tær ikki aftra seg at brúka.





Vit framleiða:
Flótilínu ◆ Spunpolyesterlínu ◆ Reyða línu
Terylene/Danlinelínu ◆ Reina Terylenelínu
Hvítar, reyðar, bláar og svartar teymar nr. 4-20

Línurnar fáast úr 3,5 til 9 mm. Longd millum svøvlarnar eftir ynski.

Teymarnir fáast órippaðir ella rippaðir við húkum í ymiskum støddum.

Vit hava eisini klæðir til fiski- og arbeiðsfólk frá innast til uttast.

◆◆◆vælkomin inn á gólvið

SNØRISVIRKIÐ
í Klaksvík
Tel. 455254 - Fax 457254
www.snorisvirkid.fo

TEYMAVIRKIÐ
í Runavík
Tel. 473000 - Fax 473001
www.teymavirkid.fo

Bjargingarútgerð
á sjógvi og landi

Vit bjóða tað besta innan bjargingarbátar, bjargingarvestar, eldsløkkiútgerð, bjarginar og trygdarútgerð.
Umboð fyri kenda danska merkið "Viking".



· Bjargingarbátar
· Bjargingarnet
· Yvirlivilsisdraktir
· Flótidraktir
· Bjargingarvestar
· Bjargingarkransar
· Epirbar/neyðsendarar
· Radartranspondarar
· Eldsløkkjarar
· Eldávaringar
· Branddraktir
· Umvælingar
· Eftirlit

P/F Gummibátatænastan
Mannaskarð 4, Postboks 3223, 110 Tórshavn
Tel. 31 49 13, Fax 31 06 56, E-mail: gummibad@post.olivant.fo

Vitja eisini heimasíðuna hjá Føroya Fiskimannafelag
www.fiskimannafelag.fo

## Karl Jákup 100 ár:

# Hevur upplivað allar broytingar sum kunnu upplivast!

**Tá ið vit síðsta summar í ávísum sambandi vóru staddir norðuri við Gjógv, komu vit av tilvild at hitta hin 99 ára gamla gjáarmannin Karl Jákup Sigvardsen. Hann hevur búð allar sínar dagar í heimbygdini. Vit fingu eitt prát við mannin og høvdu eitt brot av tí her í blaðnum stutt eftir, samstundis sum vit lovaðu lesarunum at koma við einum framhaldi seinni. Satt at siga hugsaðu vit tá um 100 árs dagin fyri framman, sum hann kundi halda 27. febr. aftur at ári, var honum lív lagað. Og vónandi unnist honum tað, nú bert fáir dagarnir eru eftir.**

Tað er sum kunnugt bert teim allarfæstu beskorið at røkka slíkan aldur og haraftrat hava sín førleika og vit og skil. Slíkir føðingardagar kunnu av sonnum sigast at vera burtur av sermerktir fyri ta nú so fámentu bygdina Gjógv, tí har hava ikki færri enn trý fólk rokkið upp um tey 100 seinastu 30 árini - og tað fjórða stendur nú á gáttini at trína inn í hetta liðið. Av teim undanfarnu eru tey bæði Jákupsstovusystkini: Dia og Andrea - Andrea í Fornanum, ið gift var Kristjani á Fløtti, hálvbróður Karl Jákups og móðir hansara Frederikka - Drikka á Fløtti, ið gjørdist 105 ára gomul.


*Mamma Karl Jákup var Fredrikka (Drikka á Fløtti), sum er tann elsti føroyingur í nýggjari tíð. Hon gjørdist 105 ára gomul.*

Faðir Karl Jákup - Petur Jákup á Fløtti - var tvær ferðir giftur. Í fyrra hjúnalagnum við Onnu Katrinu úr Jákupsstovu vóru synirnir Kristjan og Axel. Eftir at konan var deyð, giftist hann uppaftur við trímenninginum Frederikku, ættað av Rættini í Funningi. Saman fingu tey bæði seks børn á lívi. Karl Jákup er føddur 27. febr. 1905 og var triðja barnið í raðnum.

### Alt er broytt

Ómetaliga nógv er umskift bæði í heimbygdini, landinum og heiminum yvirhøvur á øllum økjum í langa lívi føðingardagsbarnsins. Sjálvur sigur hann, at ongantíð í søguni eru slíkar stórbroytingar farnar fram sum á lívsævi hansara. Valla er nakar ivi um, at so er.

Tá ið Karl Jákup var borin í heim, var fólkatalið í landinum kvinkað upp um tey 16.000. Við Gjógv búðu gott 200 fólk í 35 húsum. Skúlabørnini voru millum 30 - 40 í tali. Í dag man fólkatalið í heimbygdini neyvan vera omanfyri tey 50, og skúlabørnini eu 4 í tali. Tá ið Karl Jákup fór í skúla, var Hans Olaf Hansen lærari í bygdini. Ein lærari røkti tá báðar skúlarnar í sóknini -við Gjógv og í Funningi.

Dentur var lagdur á, at tú ikki forsømdi skúlan, men tey løgdu ikki minst doyðin á at hava barnið við í øllum arbeiði. Hetta var bæði neyðugt og gagnligt fyri heimið - samstundis sum ein sjálv(ur) gjørdist búgvin til tær avbjóðingar, lívið beyð seinni.

Í skúlaárunum herjaði 1. heimskríggj, sum m.a. gjørdi, at bretski trolaraflotin var ikki at síggja á grunnunum. Hetta hevði óivað tað beinleiðis við sær - serliga tey seinnu árini - at ørgrynni av fiski var at fáa. Bátarnir, ið róðu út í bygdini og avreiddu har, vóru einir seks í tali. Teir komu so mangan aftur í Gjónna søkkladnir við sløgdum og avhøvdaðum fiski.

### Fór til arbeiðis 11 ára gamal

Longu sum 11 ára gamal fór Karl Jákup í fiskaarbeiði hjá Sofus Debes, ið keypti og saltaði fisk fyri Vágsbotnhandilin. Sum hann mentist, lærdi hann har eins og aðrir dreingir at flekja og hagreiða fisk, sum kom teim seinni rættiliga til góða á skipsdekki. Petur Kristjan Joensen, keypmaður, tók eisini ímóti fiski - fyri Mortensen á Tvøroyri. Hann flakti sjálvur. Eisini Dánjal Klein keypti og hagreiddi fisk. Tann fiskurin fór inn í Vág.


*Karl Jákup verður 100 ár tann 27.februar. Hann hevur búð heima til seinasta heyst, men er nú á Ellis- og Røktarheiminum í Runavík.*

Eftir at hava fingið prestsins hond á høvdið í 1919 hugsaði Karl Jákup eins og javnaldrarnir um tað mundið næstan bara um tað eina - at sleppa til skips. Og tað skuldi av røttum heldur ikki ligið so illa fyri at gjørt dreymin til veruleika. Hálvbrøðurnir, Kristjan og Axel , førdu báðir skip, og pápin, ið hevði verið skipari í fleiri ár, skiftist nú mest at sigla við synunum báðum.

Í desember mánaði hetta árið keypti Axel saman við J. F .Kjølbro vágssluppina "Kristinu" frá Dias á Heyggi , skipara, í Vági. Dias hevði tá í fleiri ár sjálvur ført hana, og hevði hann øll árini verið fiskikongur við henni. Hetta seinasta árið, hann hevði hana, var einki undantakið. Hon var við millum 14-1500 skippundum nógv tað besta skipið í flotanum, soleiðis sum vit eisini greiddu frá í samrøðuni við Andrew hjá Dias, sum vit høvdu í blaðnum seinasta summar.

### Kundi eins væl verið gingin burtur 15 ára gamal

Sum áður sagt, tráaði Karl Jákup eftir at sleppa við hesi skútuni á Suðurlandið, men pápin fekk kortini sett hann aftur.

Tá ið febr. mánaði 1920 leið móti endanum, helt "Kristina" til havs yvir á Suðurlandið. Manningin taldi 17. Teirra millum vóru faðir, bróðir og hálvbróðir Karl Jákups.

Um mánaðarskiftið herjaði satt ódnarveður um norður Atlantshavið. Einki sannspurdist eftir hetta um tær báðar sluppirnar "Kristinu" og "Helenu", ið helst eru farnar í hesum ovurveðrinum.

Tá ið komið var út í mai mánað - og bert tøgn framvegis valdaði um hesi bæði skipini - vóru allar vónir brostnar um at síggja teirra kæru aftur.

Á Fløtti við Gjógv sat hin 44 ára gamla Frederikka eftir sjálv sjeynda. So mong heim vóru stødd í slíkari støðu, serliga í slupptíðini - árini báðumegin aldaskiftið - tí tað var so mangan, at skip og bátar ikki spurdust afturíaftur. Eftir sótu konur og børn - í djúpari sorg og mangan á berum. Kostirnir vóru tí mangan og hjá mongum annaðhvørt at lúta og seta børnini út ella taka dystin upp. Vit vita, at mamman og tá 15 ára gamli Karl Jákup høvdu í ráði, hvat gerast skuldi.

### Máttu stríðast saman at halda húsinum uppi

Tey tóku ta avgerð at stríðast saman at halda húsinum uppi. Karl Jákup tók á sínar ungu herðar alt mansarbeiði á sjógvi og landi, og mamman knossaðist á sín hátt bæði úti og inni. Saknurin kendist mangan svárur í uppvøkstrinum ongan pápa ella abba at hava at hella seg til við spurningum og ráðum.

Havið, ið tók teirra kæru við Kristinu, hevði eisini tikið abba teirra á Fløtti, Kristjan, í sín favn. Hann gekk burtur við 8-mannafarinum Samløguni í 1884. Og tað sama hav hevði enn eina ferð kravboð til teirra. Yngsti bróðirin, Petur, ið bert var hálvt annað ár, tá ið hann gjørdist faðirleysur, sjálætst á báti í Grønlandi á sínum 40 ára føðingardegi.

Víst vóru smeitirnir dyggir, ið raktu barnaheimið


*Karl Jákup náddi at fáa snellutíðina við. Her umborð á "Fagranes", helst í 1957 ella 1958.*



*Karl Jákup og konan Elisabeth.*



*Karl Jákup rakar saman á 96. ári í Lutastaðgerði.*



*Gomul mynd úr Gjógv. Húsini sum standa oman og niðan nr. 2 frá brúnni er á Fløtti. Konan við vegjaðaran er Anna, kona Sand prest.*

hjá Karl Jákup og hansara kæru, men við einari sterkari trúgv, styrki og áræði vunnu tey ígjøgnum og fingu húsið undan.

Tey næstu árini læt Karl Jákup alt, ið hann forvann, til heimið. Og tá ið tann næsti bróðirin, ið var hálvt fjórða ár yngri, var tilkomin, tók eisini hann við.

Karl Jákup giftist í 1931 við Elisabeth, dóttur Pól Jóhannes á Bø. Tey fingu tríggjar dreingir, ið allir gjørdust lærarar.

**Eitt drúgt lív á sjónum**

Vit hava m.a. eisini spurt Karl Jákup, hvørjum skipum og skiparum hann sigldi við.

Tað fyrsta skipið, sum hann var við, var deyðsiglarin Star of Hope, sum Kristjan á Fløtti, við Gjógv, førdi, og við tí var hann 1921 og 1922. Í 1923-24 og 25 var hann við William Stephansson. Skipari var Jacob á Nesi. Tað var tá, at hann var saman við tónaskaldinum Hans Jacob Højgaard, sum vit greiddu frá í umrøðuni av Karl seinasta heyst. Í 1926 var hann við Vigilant - einum deksbáti, ið Mortensen á Tvøroyri átti. Viberg á Sevmýru var skipari. Í 1927 og 28 var hann við Emerald, ið var deyðsiglari. Kristian á Fløtti førdi Emerald hesi árini.

Veturin 1928 lærdi Karl Jákup til motorpassara í Keypmannahavn. Pápin hevði mælt honum til hetta, tá ið hann fór sín síðsta túr, og hetta var í grundini orsøkin til, at hann gjørdist motorpassari.

Í 1929 og 30 var hann við Acorn. Karl Anton á Bø, við Gjógv, var skipari á Acorn undir Íslandi, meðan pápi hansara, Poul Jóhannes á Bø, var skipari undir Grønlandi.

Í 1931 og 32 var hann við Kristinu, ið Símun í Sámalsstovu, við Gjógv, førdi.

Í 1933 og 34 var Karl Jákup við Gudrun Zoegu, sum Kristjan á Fløtti førdi. Í 1935 og 36 við Polarfarinum, sum Oliver Thomsen, úr Gøtu, førdi.

Í 1937-38 og 39 var hann við Onnu, sum Óla Jacob á Sandi førdi. Meðan teir royndu undir Íslandi í september mánað 1939, kom eldur í Onnu. Eldurin var so ógvusligur, at teir máttu fara av skipinum og í bjargingarbátin. Veðrið var tíbetur gott, og teir vóru bara nakrar fáar tímar í bátinum. Um 10-11 tíðina um kvøldið kom eitt norskt sildaskip fram á bátin, tók teir upp og flutti teir inn á Tórshavn. Seinni komu teir so til Føroyar við Drotningini.

Í 1940 var Karl Jacob við Fame, sum Sofus Hilduberg, við Gjógv, førdi. Í 1941 var hann heima, og hetta árið arbeiddi hann í Havn. Í 1942 og 43 var hann aftur við Fame, sum Meinhard Jacobsen, úr Fuglafirði, nú førdi. Í 1944 var hann heima og róði út. Um várið 1945 var hann aftur við Polarfarinum, sum Oliver í Gøtu førdi. Summarið og heystið hetta árið róði hann út á Norðlandinum - í Raufarhøfn.

Í 1946 og 1947 arbeiddi hann í Reykjavík.

Í 1948 var hann við Seagull, sum Petur Skeel Dahl, í Funningi, førdi. Í 1949 við Føroyinginum, sum Olrik á Rætt, við Gjógv, førdi. Í 1951 og 52 arbeiddi hann fisk í Klaksvík. Í 1953 og 1954 var hann við Dragabergi, sum Jóanes hjá Dáva, í Klaksvík, førdi, og tey seinastu árini til skips: 1955 - 56 - 57 og 58 - var hann við Fagranesi, sum Tummas í Heiðriksstovu, við Gjógv, førdi.

Hann gavst við sjólívinum 1958. Tá var vegarbeiðið byrjað, ið skuldi knýta bygdirnar Gjógv - Funning - Eiði saman. Hann fór í hetta arbeiðið, og seinni arbeiddi hann á Oyggjarvegnum og í Havn, til hann gavst sum pensionistur.

Eftir at hann fór úr lønandi vinnu, róði hann út í heimbygdini og var annars virkin langt upp í ellisár.

Til stuttleika kunnu vit at enda nevna, at føðingardagsbarninum í fjør møguliga veittist tað met í Føroyum yvirhøvur, tá hann gjørdist langabbi at 5 børnum, ið borin vóru í heim av 2 mammum innan fyri 3 vikur. Ein abbadóttir fekk tvíburar, meðan ein abbasonur gjørdist faðir at tríburum.

**Hjartaliga tillukku við teimum 100 árunum**

Vit vilja ynskja Karl Jákup hjartaliga tillukku við teimum 100 árunum. Tað hevur verið okkum ein fragd at vera komin at kenna henda fróðarmann, sum er so skilagóður og sum framvegis fylgir so væl við í tí sum hendir í samfelagnum. Og vit eru takksom fyri, at tað er eydnast við hjálp av hansara synum at kunna fáa hesi brot í hansara lívi sett á prent.

# Barnaheimið

**Sonur Karl Jákup, Petur Jacob, hevur skrivað Gjáar søgu í fleiri bindum. Eitt kapittul eitur "Barnaheimið", og fara vit at endurgeva nøkur brot úr hesum parti, sum sigur nakað um tann førning hann og beiggjarnir Hans Jacob og Pól Ásfinn hava fingið við sær:**



*Brøðurnir Hans Jákup (t.v.) og Petur Jákup sita Eysturi á Heyggi. Matróshúgvurnar vóru avbildnar tá á døgum. Á aðrari stóð "Triton" og á hinari "Tjaldur".*

Peningur var lítil og eingin millum fólk, og tí mátti mestsum alt verða fingið við bit og slit til lívsins uppihald.

Tað ráddi um at taka tøk í felag. Men hetta harða stríðið fyri tí dagliga breyðnum, har eisini smábarnið hjálpti til eftir førimuni, bant ættarliðini saman í ein sterkan felagsskap.

Ættarbondini og ættarkenslan komu tí at vera ómetaliga sterk í fólkinum, og trúskapur Føroyinga móti ættini, um hon enn var langt burtur, er tiltikin enn á døgum.

Tá dreingjabarnið var so frægt til aldurs, var tað eisini tikið við í bátin, tá ið umstøður vóru til tess. Børnini vóru tí tíðliga lærd at taka við, har hini sleptu.

Tann kristna boðskapin fingu vit eins og bornan inn við móðurmjólkini. Fyrsta vit dugdu á at skyna, vórðu vit lærd at leggja okkum í Guds hond, sum tað varð sagt. Vit vóru altíð signað, tá vit fóru út um morgunin og til songar um kvøldið. Signingin fór fram á tann hátt, at meðan krossur varð ristur 3 ferðir fyri ennið, vórðu hesi orðini søgd: Gud Fader, Guds Søn, Gud den Helligånd. Eingin fór at eta uttan at orðini, *Jesus veri við mær!* vórðu søgd.

Vit børn sluppu ongantíð útum at spæla fyri kirkjutíð sunnudag, og sunnudag skuldu vit fara í kirkju.

Hjá okkum var lestur lisin hvønn sunnudag, so tey ið av eini ella aðrari grund ikki vóru í kirkju, hoyrdu lesturin heima. Tað var ikki minst hesar løtur, tú kendi samanhaldið og samljóðið innanveggja, tá ið sálmasongurin ljóðaði so fagurliga, uttan at hugt varð í bók, alt meðan døgurðapotturin stóð og kókaði á komfýrinum. Tá var gott at vera barn, tí hóast korini vóru fátækslig hjá teim flestu, so namst tú her eitt ríkidømi, ið ikki var av hesum heimi.

Orðini *Tú mást!* og *Tú mást ikki!* ljóðaðu tí ofta og títt fyri oyrunum á okkum bæði í heimi og skúla, og onkur kundi halda revsingina vera ið so harða fyri brot móti hesum reglum og lívshátti.

Men tó haldi eg meg kunna siga, at henda uppalingin megnaði at leggja eitt rættiligt trygt støði undir barnsins lív.



*Yngsti bróðurin, Ásfinn, so brosandi á trappuni í grannahúsunum.*




Í blað nr. 332 høvdu vit hesa myndina av manningini á Sildrekanum í 1964. Vit hava nú fingið nøvnini á øllum uttan einum. Veit nakar hvør hann er vilja vit fegin frætta. Vit hava býtt myndina upp í eitt aftara rað, sum helst stendur á sildatunnum og eitt fremra rað, sum stendur á dekkinum.

Aftara rað:
Georg Rasmussen, Kjartan Sivertsen, Sjúrður Hansen (kemur bert partvíst undan), Petur Jacob Johannesen, aftast, Júst í Túni, fremst í raðnum, Sámal Rasmussen, Hjørleif Jacobsen, Sámal G Jacobsen, Andreas í Túni, John Højgaard, Hans Petur Poulsen, Alfred Hansen, Harry Højgaard, Magnus Winther Hjelm, Klæmint Hammer, Eyðun Mikkelsen.

Fremra rað:
Petur í Túni, Theodor Eliassen, John Poulsen, Jack Højgaard, hann er frammanfyri John, Petur Guttesen, Kristian í Túni, Johannes Poulsen, Ingi Jacobsen, Osvald Sivertsen, Absalon Sivertsen.

Vit høvdu í seinasta blað aðrar myndir frá Sildrekanum. Nakrar eru úr Havn, meðan hinar eru úr Norðdepli. Fleiri av partareigarunum vóru higani.

# Nýggj manningarmynd

**Latið okkum frætta, um onkur kennist við hesa manning. Myndaeigari er Føroya Fornminnissavn.**







# Hvør skal hava rokningina?

**Tí at líkasum tey nógvu vóru syndarar við ólýdni hins eina mans, soleiðis skulu eisini tey nógvu verða rættvís við lýdni hins eina. Róm.5,19**

Ein maður kendi seg sjúkan og fór tí til lækna. Eftir at læknin hevði kannað mannin, og lurtað eftir frágreiðing hansara, segði hann:

-Hetta er óivað ein arvulig sjúka-!

-So senda tygum rokningina fyri kanningina til pápa! segði maðurin rísin.

Menniskju hava lætt við at vísa skuld og ábyrgd frá sær.

Mong siga, at tey bara kunnu hava ábyrgd av tí, tey sjálvi gera og hava ávirkan á.

Tað kann ikki verða teirra skuld og ábyrgd, at Ádam og Eva syndaðu og blivu rikin burtur frá Gudi.

Eru tey syndarar, eru tey fødd sum syndarar og kunnu ella skulu einki gera við tað.

Hetta er teirra lutur og lagna, sum Gud, á ein ella annan hátt, má finna seg í og góðtaka.

Í fyrstu syftu kann hetta tykjast skilagott og rættvíst, men bíbilskt er tað als ikki.

Rætt er tað, at Ádam og Eva syndaðu, og at øll menniskju, ið fødd eru síðani, burtursæð frá Jesusi, eru fødd við synd - arvasynd. Deyðin kom, sum fylgja av syndini.

Sjálvt lívið er ein gáva, tú ikki hevur biðið um. At tú ert til - livir, møtir tær tí bæði sum tín lutur, lagna og sum tín ábyrgd.

Tín lutur, lagna er eisini, at tú føddist sum syndari. Harafturat gert tú syndir í hugsan, orð og gerð. Sostatt ert tú ikki bara arvuliga sekur, men eisini persónliga sekur fyri Gudi. Hetta er tín ábyrgd.

Syndarokningina kanst tú ikki senda til foreldrini ella til fedrarnar. Teir eru og vóru líka sekir og hjálparleysir sum tú.

Tín synd er tín persónliga synd - og ábyrgd, sum tú als ikki megnar at gjalda sjálvur.

Gleðiboðskapurin er, at tú kanst sleppa undan syndarokningini, Guds rættvísa dómi og glatan, um tú bert hana til Jesus.

Hann hevur goldið og bløtt fyri allar heimsins syndir fyri 2000 árum síðani.

Jesus er annar Ádam, sum frelsir frá arvasynd og persónligari synd.

Hansara rættvísi verður tilroknað tær, í somu løtu tú kemur til hansara.

Tá verður tú rættvísgjørdur av trúgv, og eigur tí frið við Gud. Róm.5,1

*Orð hans sigur tær greitt, at tú koma víst kann*
*- nær sum helst, hvørja stund og hvønn dag.*
*Sjálvt ta svárastu synd kanst tú leggja á hann,*
*sum var gjørdur til synd í tín stað.*

*Ms.365*

# Aðalfundur

**Ársaðalfundur Starvsmannafelagsins verður leygardagin 26. februar 2004 kl. 13.00 í Útvarpshøllini.**

**Skrá:**
1. Frásøgn formansins frá
a) farna ári og
b) virki felagsins framyvir - herundir komandi sáttmálasamráðingar.
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapum til góðkenningar.
3. Lógarbroytingar
4. Møgulig uppskot frá limum og nevnd.
5. Ásetan av limagjøldum.
6. Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum.
7. Val av roknskapargrannskoðara og tiltakslimi.
8. Ymiskt.

Limir sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi leygardagin 19. februar 2005.

**STARVSMANNAFELAGIÐ**

# Aðalfundur

**Ársaðalfundur í Eftirlønargrunni Starvsmannafelagsins verður hóskvøldið 24. februar 2005, kl. 19.00 í hølum Starvsmannafelagsins, J.H. Schrøtersgøta 9.**

**Skrá:**
1. Frásøgn um virki grunnsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársrokniskapi til góðkenningar.
3. Viðtøkubroytingar.
4. Val av nevndarlimum.
5. Ymiskt.

Limir sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi hósdagin 17. februar 2005.

**NEVNDIN**




## Línubustir og goggar

Hondbundin føroysk línubust
og hondgjørdir goggarar

Verða sendar um alt landið

**Bílegging:**
tlf: 42 40 34 / 42 30 01
fartlf: 21 33 17
fax: 42 47 97

**Fløttislið** (limur í Føroya blindafelag)



**Føroya største úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

**Vit útvega eisini:**
Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir
Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur
Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni
Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

... sjálvandi til besta prísin !!

DANAK Reg.nr. 5001 Kvalitetssytringssystem certificeret i henhold til DS/EN ISO 9001 af Det Norske Veritas, Danmark A/S

FARPACK
Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com




Starvsfólkalýsing

# Skipaeftirlitsfólk

**Skipaeftirlitið søkir eftir einum skipaeftirlitsfólki at seta skjótast gjørligt.**

Skipaeftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- í samstarvi við løgfrøðingin á Skipaeftirlitinum at umsita og dagføra tekniska partin av lógarverkinum innan sjóvinnuøkið við støði í altjóða sáttmálum
- málsviðgerð innan nautiska- og skipsbyggitekniska eftirlitsøkinum við serligum atliti til fiskiskip og ferðamannaskip.
- at hava umsjón við teimum løggildaðu klassafeløgunum o.ø. feløgum ella persónum, sum eru góðkendir til at gera tekniskar kanningar v.m.
- at hava eftirlit við skipaútgerð
- at hava eftirlit við arbeiðsumhvørvinum umborð á skipum, undir hesum samstarv við vinnuna og aðrar myndugleikar.

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst viðkomandi útbúgving sum t.d.:
- skipsverkfrøðingur
- verkfrøðingur sum er serkønur innan sjóvinnu
- maskinmeistari við víðkaðum maskinmeistaraprógvi og sjóvinnubrævi sum skipsmaskinstjóri, STCW III/2
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Dentur verður lagdur á, um umsøkjarin hevur viðkomandi starvsroyndir.

Harumframt er kunnleiki til góðskustýring (kvalitetsstýring) ein fyrimunur.

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 18. februar 2005, kl. 14.30.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Skipaeftirlitið
Postmoga 26
370 Miðvágur

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355 600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.

**SKIPAEFTIRLITIÐ**

Skipaeftirlitið, Miðvágur, Postrúm 26, 370 Miðvágur, Tel 355 600, Faks 355 601, fma@fma.fo, www.fma.fo

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna • Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar
Tlf: 311569




Læknin: "Fylgdu tú ráðum mínum fyri svøvnloysi og taldi seyðir?"
Sjúklingurin: Ja, eg kom til 24.567, tá lýsti og eg noyddist at fara upp."

*****

Tveir sakførarir sita á eini matstovu.
Teir bíleggja tvey gløs av cola og seta seg við eitt borð og taka síðani hvør sín matpakka upp úr taskuni.
Tænarin kvikar sær yvir til teirra og sigur:
- Tit mugu ikki eta tykkara egna mat her á matstovuni.
Sakførarirnir hyggja eina løtu hvør uppá annan, og býta síðani um matpakkar.

*****

Hin gamli sakførarin var ógvuliga sjúkur, og tá besti vinmaður hansara kom at vitja hann á sjúkrahúsinum, lá hann og las í Bíbliuni.
- Hvat gjørt tú? Spurdi vinmaðurin.
- Leiti eftir holum.

*****

- Hvør munur er millum ein lærara og eina apu?
- Stavihátturin.

*****

-Góðan dagin, eg savni inn til eitt heim fyri eldri kvinnur.
- Óført, tú kanst fáa vermóðir.

*****

- Hvussu veitst tú at Ádam var í Paradísi?
- Hann hevði onga vermóðir!

*****

Hvør er munurin millum ein kamel og ein kommunumann?
Kamelurin kann arbeiða í 2 vikur uttan at drekka, og kommunumaðurin kann drekka í 2 vikur uttan at arbeiða.



*Jens Joensen t.v. og Christian Christiansen bjargaðu á útróðri neyðstaddan útróðrarmann.*



*Her handar Suni Winther, formaður í Reyða Krossi, Suna Frank Simonsen heiðursbræv. Suni er fakfelagsmaður og er virkin í handverkarafelagnum.*

# Ársins 1. hjálpari 2004

Tann 15. februar var kjósaði Reyði Krossur ársins 1. hjálpara, og var hetta fjórðu ferð, at tað hendi.

**Hendingin aftanfyri ársins fyrstahjálpara**
Tann 29.07.04 um kl. 21:30 fara smádreingirnir Tórur í Niðristovu Durhuus, Magnus í Niðristovu Durhuus og Jóan Petur í Niðristovu á súkklum oman á kajuna í Vestmanna.

Sum teir súkkla har eru teir eisini heilt úti á kajkantinum, tá Tórur, 5 ár, onkursvegna fær annað beinið í klemmu og missir tamarhaldi á súkkluni, dettur og lúkst á sjógv.

Hinir dreingirnir, 8 ára gamlir, royna at hjálpa, men røkka ikki. Tá ger Magnus av at leypa á bláman, fær fatur á beiggja sínum og fær so báðar inn móti kajini, har teir hildu sær fast í eitt bildekk.

Her rópti Magnus so til Jóan Petur um at fara eftir hjálp. Eingin var at síggja á kajuni, tí fór Jóan Petur beina leið heim eftir pápa sínum.

Suni Frank Simonsen, maskinmeistari á flakavirkinum, var samstundis komin oman á kajuna. Hann hoyrir barnaprát og ferð at leita eftir, hvat hetta er. Hann varnast so, at Magnus og Tórur svamlbla í sjónum.

Suni Frank ber skjótt at, stóð niður á eitt bildekk og fær "blaka" dreingirnar, ein fyri og annan eftir upp á kajuna - tá kom meira hjálp til.

Tískil gjørdist Magnus í Niðristovu Durhuus ársins fyrstihjálpari og Símun Simonsen fekk heiðursbræv.

**Bjargingarbragd á sjónum**
Tann 22.03.04 fekk m/b "Norðstjørnan" brotasjógv í Eiðisflógva á veg inn av Norðhavinum.

Hans Magnus Hansen, Søldafirði var einsamallur umborð.

Standurin var ringur, maðurin kom uppá stýrihúsið og helt sær fast í ein



*Her er Magnus saman við beiggjanum, sum hann bjargaði, Tórur, og mammuni Marin.*

enda, sum hann fekk bundi um annan armin.

Aldut var í sjónum, so sýnið at síggja bátin var ringt.

Og tó.

Báturin "Elin C", við Cristian Christiansen og Jens Joensen, báðir úr Kollafirði, ið eisini vóru á veg inn, løgdu merki til ein nærum bát, og sigldu ímóti staðnum.

Í ringum veðri fingu Christian og Jens tó manøvrera seg fram til havaristin og bjarga Hans Magnusi, sum nær var fallin í óvit.

Jens og Christian fingu harnæst hjálpt Hans Magnusi úr vátu klæðunum og teppi um hann at verma seg við.

Eitt satt bragd, sum tað eisini er sent uppskot inn um til Rigspolitichefen at veita teimum viðurkenning.

Teir báðir Christian og Jens fingu heiðursbræv fyri bragdið.

**Palli brúkti høvdið**
Tann 28.03.04 er Palle Rasmussen í bili á veg eftir Oyggjavegnum norðureftir móti Kollfjarðadali. Kl. er um 0815.

Komin á Hvilvtenni, hetta er nakað norðanfyri Grótbrotið, leggur hann merki til eina bingju ella líknandi væl niðanfyri vegin.

Okkurt var, sum fekk hann at steðga upp og hyggja nærri eftir og kom hann tá fram at einum bili, ið var farin av vegnum, og nakað frá, eina kvinnu, sum hann helt heilt var í øðrum heimi "stå paralyseret".

Um hon stóð uppi ella lá niðri, minnist hann ikki, men sambært tað hann síðan hevur fingið at vita, var hon ikki før fyri at standa.

Lukkutíð kundi hann kalla hjálp yvir radio.

Palle fær tosa við kvinnuna og soleiðis staðfest, at hon var við vit, hon verður ballað inn í ymisk klæðir e.l., so hon ikki skal gerast køld.

Palli er um hana, og tryggjar sær, at pulsur og andadráttur eru, hann spyr og hyggur eftir og følir seg síðan tryggan um, at kvinnan var einsamøll.

Hann er um kvinnuna til hjálp og ambulansi kemur á staðið.

**Aftur galið í Vestmanna**
Tann 21.10.04 um kl. 16:30 var Torstein Paulason Brattaberg farin at spæla við vinmenn sínar í Vestmanna.

Hvar spæla smádreingir? Sum vit hoyrdu frammanfyri, so spæla teir alla staðni og vóru hesir farnir at spæla í eini neystagrund.

Ein planki var, sum kanska kundi brúkast at sigla við, so hann skuldi fáast av neystagrundin og her hendir so tað, at tá plankin skal "koppast" niður dettur Torstein við.

Fallið var um 5 - 6 metrar, men til alla lukku, var flóð. Men áðrenn Torstein kemur á sjógv, hevur hann sligið høvdið í.

Skamt frá er nýggja kappróðrarneystið, har Rólant Isaksen og Jóni Durhuus arbeiddu.

Vinmenninir hjá Torsteini, Jákup, Magnus og Rói fóru tí til kapparóðrarneystið at leita eftir hjálp.

Rólant og Jóni bera skjótt at. Knortlut, nógv grót, sera illgongt er á staðnum, men skjótt komu teir á staðið og leyp annar úti og fekk drongin upp.

Teir so at fáa fatur á lækna, sum helst ikki var í bygdini - ringdu og boðaðu abbanum frá og avgjørdu at koyra dreingin til skaðastovuna.

Á vegnum syrgdi Rólant fyri at halda dreinginum inn at sær og at halda um hann.

Ringt var so til pápan og mammuna og var so pápin kom ímóti teimum og kundu hava dreingin og Rólant í sínum bili, og tá teir komu á skaðastovuna, var mamman har.

Mamman rósar bjargingarmonnunum fyri ta umsorgan, teir hava givið foreldrunum.

Serliga fær Rólant rós fyri at duga væl at boða frá vanlukkuni og við tað, at hann fleiri ferðir hevur haft samband við foreldrini aftaná.